*Í felag fyri teg*

# PEDAGOGBLAÐIÐ

Nr. 1 | 2023 | pedagogfelag.fo



**Nýggj stovnspláss í Havn hava ikki skund:**

## HAVNIN HEVUR IKKI STOVNSPLÁSS TIL ØLL BØRNINI

## NEI TAKK TIL FLEIRI HERÐAKLAPP

**Dagstovnaráðið mælir til at bera skjótt at**

**10 nýggir bústovnar í 10 ár**

**Námsfrøðin skal verða sjónlig**

*Aðalfundarblaðið*

FØROYA PEDAGOG FELAG

Útgevari
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

Lagt til rættis
Ingolf S. Olsen - PRESS

Layout
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

Prent
Føroyaprent

Upplag
2.200 eintøk

## NEVND



Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo



Annika Østerø
Skrivari
annika@pedagogfelag.fo



Harald Joensen
Nevndarlimur
harald@pedagogfelag.fo



Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo

## UMSITING



**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo



**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

**4** Frágreiðing frá nevndini: – Í felag fyri teg

**9** Havnin hevur ikki stovnspláss til øll børnini

**11** Formaðurin er bjartskygdur

**15** Dagstovnaráðið mælir til at bera skjótt at

**18** Skráin til aðalfund felagsins 11. mars 2023

**21** Nei takk til fleiri herðaklapp

**27** Samgongan bindir seg við lyftum

**28** Vit mugu vera tilvitað um nærveruna

**36** 10 nýggir bústovnar í 10 ár

**41** Lógarfest Normering og fyrireiking

**46** Ein torfør uppgáva

**48** Lógin skal vera klár á ólavsøku

**50** Námsfrøðin skal verða sjónlig

**52** Støðan merkir virksemið

**54** Krøv um eftirløn og nevndarsess

ODDAGREIN

Jógvan Philbrow, formaður, skrivar

# Námsfrøðin skal vera sjónlig



"Týðilig námsfrøði í arbeiðinum". Soleiðis ljóðar felags yvirskriftin, sum vit í ár hava gjørt av at seta á aðalfundin, og meint verður sjálvsagt í fyrsta lagi við fakligheitina á teimum ymisku námsfrøðiligu arbeiðsplássunum – tað kann vera um, hvussu hjálparfólk, námsfrøðingar og leiðarar best fáa brúkt sínar førleikar og sett orð á innihaldið í arbeiðinum, soleiðis at talan ikki bara verður um "ansing".

Yvirskriftin er eisini í samljóði við arbeiðið at endurskoða felagið, ið var gjørt í 2018, og sum vísti, at limirnir ynsktu, at sjóneykan var sett á tað námsfrøðiliga fakið.

Um námsfrøðiliga uppgávan bara skal snúgva seg um ansing, so verður talan um eitt passivt starv uttan framdrift og uttan tørv á nakrari serligari vitan – tó so, um talan er um at ansa eftir menningini og at ansa eftir, at eitt heilsugott, rørsluliga stimbrandi og gott sálarligt umhvørvi er karmur um gerandisdagin hjá børnum og øðrum, ið tørva námsfrøðiliga umsorgan og tænastur, tá verður tað fakliga innihaldið eisini ein sjálvfylgja. Soleiðis ber til at hava tvey púra ymisk útgangsstøði fyri hugtakinum ansing.

Fyri at tað skal verða lættari hjá limum okkara at seta orð á arbeiðið og tørvin á námsfrøðiligum førleikum, fer felagið at hugsavna seg um, hvussu vit – tað er limirnir – kunnu verða týðuligari í arbeiðinum.

Fyri tann, ið søkir eitt nýtt starv, hevur tað týdning at kunna vísa á, hvørjar førleikar og royndir viðkomandi hevur at bjóða arbeiðsplássinum og serliga, hvørjir teir námsfrøðiligu førleikarnir eru.

Fyri tann, ið skal samskifta við foreldur ella avvarðandi, er tað sama galdandi. Tað skal vera greitt og lætt at seta orð á, júst hví gerandisdagurin á stovninum er settur saman, soleiðis sum hann er.

Í samskiftinum við heilsu- ella røktarfakligt starvsfólk er eisini neyðugt at duga at seta orð á tær námsfrøðiligu avbjóðingarnar, ið kunnu verða gloymdar burtur, um atlit og orð ikki verða sett á relasjóns-tørvin hjá tí einstaka menniskjanum.

Hugsanin er, at aðalfundurin skal verða byrjanarstigið í átakinum, og at tey ymisku ráðini hvørt í sínum lagi eisini seta sjóneykuna á hetta evnið. Aðalfundurin skal hesa ferð eisini taka støðu til tvey uppskot frá nevndini um broytingar í lógum felagsins.

Fyrra broytingin er, at tað skal bera til at velja tiltakslimir serstakt í felagsnevndina og ráðini á aðalfundinum. Higartil hevur tað verið so, at tey, ið ikki hava rokkið ein sess á nevndar- og ráðsvalunum, eru vorðin tiltakslimir. Men vit hava nú upplivað, at tað hava verið so fá uppstillað, at bara ein ella ongin hevur verið "til avlops" at kunna taka við sum tiltakslimur. Hetta kann gerast ein trupulleiki, um nevndar- ella ráðslimur av onkrari orsøk gerst óvirkin ella er ógegnigur í onkrum máli.

Onnur broytingin, sum verður skotin upp, er um lýsing av aðalfundinum. Í lógum felagsins er ásett, at aðalfundurin skal lýsast í føroysku bløðunum í seinasta lagi 15. januar, men tey fækkast skjótt, og spurningurin er, hvussu leingi vit hava nakað føroyskt blað eftir. Vit liva í einum talgildum veruleika, og heimasíðan er okkara egni miðil. Tað er har, limirnir fara at leita sær kunning, og tí skjóta vit upp, at tað er á okkara egnu heimasíðu, at kravda lýsingin verður frameftir.

Tey bæði uppskotini eru nærri lýst í skránni inni í blaðnum. Við hesum vil eg ynskja okkum øllum ein góðan aðalfund.

## Frágreiðing frá nevndini:

# – Í felag fyri teg

**At taka sær stundir at hyggja aftur um bak at gjørda arbeiðinum er ein góður skikkur – væl at merkja tá tað verður gjørt við tí fyri eyga at læra av gjørdu royndunum og fyri at eftirmeta tað, sum er komið burtur úr.**

Tað skal ein slík frágreiðing sum henda í stóran mun brúkast til – at eftirmeta farna arbeiðsárið og meta um, hvørt úrtøkan er ella fer at verða nóg góð.

Tað, sum vit serliga fara at minnast 2022 fyri, er, at hetta var árið, har samfelagið alt, men serliga arbeiðsgevararnir, veruliga ásannaðu, at trot er á arbeiðsmegi á námsfrøðiliga yrkisøkinum, ikki minst á fakligari arbeiðsmegi.

Í fleiri umførum vóru vit á fundum við Fróðskaparsetrið, Mentamálaráðið og mentanarnevnd Løgtingsins um tørvin á, at fleiri fáa møguleika at útbúgva seg til námsfrøðing. Hetta tykist nú at vera hoyrt, og verða nú tveir flokkar í av námsfrøðingum tiknir inn í ár.

Í samgonguskjalinum hjá nýggju samgonguni stendur eisini, at arbeiðast skal við at gera útbúgvingarmøguleikarnar meira atkomiligar. Hyggjast skal eisini at námsfrøðihjálparaútbúgvingini, soleiðis at henda útbúgvingin kann geva atgongd at lesa víðari til námsfrøðing.

Somuleiðis tykjast løgtingspolitikarar at hava skilt, at lønarviðurskiftini mugu lagast til nútíðarsamfelagið, og eitt lønarlyft er lovað teimum, ið arbeiða á umsorganarøkjunum, og sostatt eisini námsfrøðingum og hjálparfólkum. Á hvønn hátt hetta fer at síggjast aftur, vita vit vónandi um góðan mánað, tá verandi sáttmáli skal endurnýggjast. Í skrivandi stund eru vónirnar og væntanirnar stórar.

2022 bleiv tó ikki árið, har vit kundu fegnast um, at "yvirtíðarmálið", sum vit stríðast við Almannaverkið um, er liðugt. Hetta er eitt mál sum hevur verði í gongd síðani 2018.

Flest allir okkara limir, sum eiga pengar til góðar, hava nú fingið endurgoldið ein part av upphæddini, ið vit hava mett Almannaverkið skyldað teimum, hóast vit enn eru ósamd um, akkurát hvussu tímarnir skulu gerast upp. Vónandi fáa vit greiðu á hesum seinni í ár.

Fakfelagssamtarvið hevur eisini havt ein virknan leiklut í farna árið, serliga við einari kanning av avleiðingunum av at stytta arbeiðsvikuna. Eitt arbeiðið, sum má sigast at hava havt stóra ávirkan á kjakið fram til løgtingsvalið 8. desember. Stytt arbeiðsvika og rætturin at kunna draga limagjaldið frá í skatti, vóru tveir boðskapir, sum Fakfelagssam-



*Nevndin í Føroya Pedagogfelag, sum hon sá út eftir seinasta aðalfund. Úr vinstru er tað Nikkil Heinesen, næstformaður, Gunnvá Akraberg Hansen, Jógvan Philbrow, formaður, Annika Østerø, skrivari, Valborg H. Hammer, og Harald Joensen, tiltakslimur. Síðan er tað hent, at Valborg H. Hammer er farin úr nevndini, og Harald Joensen hevur tikið sæti í hennara stað*

*Mynd: Bárður Lydersen*

tarvið ynskti at fáa á breddan í valstríðnum.

Gjøgnum árið er eisini arbeitt við at endurskoða arbeiðstíðarreglurnar, og verður tað eisini eitt, sum vit fara at leggja fyri arbeiðsgevararnar í komandi sáttmálasamráðingum.

Árliga gjaldið til Taks uppá 60.000-70.000 krónur fyri umsiting av frítíðarkontunum er nú steðgað við tað, at ein lógarbroyting er gjørd. Hetta hendi eftir áhaldandi trýst frá okkum og øðrum fakfeløgum, tí vit hildu ikki, at tað var rímiligt, at bert summi feløg skuldu bera kostnaðin fyri umsitingina av frítíðarlønunum.

Alt 2022 var gongd í innsavningini av upplýsingum og arbeiðinum við uppskotum til samráðingarnar, sum verða í ár.

Her er eitt stutt yvirlit yvir virksemið farna aðalfundarárið:

## Mars

Flóttafólk, landsstýrið boðaði frá, at Føroyar skuldu taka ímóti flóttafólki. Vit settu gongd á at savna tilfar um, hvussu hetta best kundi skipast og fyrireikast – tíverri var tað farið lætt um hjá myndugleikunum.

Felagið var til hoyring um barnavánttanir, har vit mæltu til, at lógin var samtykt. Lógin varð endaliga samtykt í mai.

18. mars vóru vit til framløgu av heildarætlanini um at fyribyrgja og tálma rúsevnismissnýtslu. Hetta vórðu vit eisini hoyrd um nakað frammanundan.

23. mars var hoyring í rættarnevnd Løgtingsins um "rættin at arbeiða fulla tíð", eitt uppskot, ið skuldi virka fyri, at almenn størv verða lýst fyrst sum fulltíðarstørv. Uppskotið var eitt andstøðuuppskot og fall.

30. mars vóru vit til hoyring um eitt uppskot um at útbúgva fleiri námsfrøðingar. Umrøtt var eisini, um tørvur var á tveimum útbúgvingarleiðum – dagstovnanámsfrøði og sosialnámsfrøði. Felagið mælti til, at útbúgvingin gerst meira rættað móti teimum ymisku virkisøkjunum.

## Apríl

1.-2. apríl høvdu nevnd, umsiting,

leiðararáð, námsfrøðingaráð og hjálparfólkaráð felags arbeiðsdag – "visjóns- og strategidag" – har orð vóru sett á, hvat hesi skuldu arbeiða við komandi árið, eins og samskift var tvørtur um mørkini ímillum bólkarnar um tørvirnir hjá øllum.

Ein arbeiðsbólkur við limum á tí sosialnámsfrøðiliga arbeiðsøkinum setti sjøtul á at endurskoða arbeiðstíðarreglurnar. Hetta arbeiðið snýr seg um at gera arbeiðstíðarreglurnar meira tíðarhóskandi og lætt lesiligar. Endamálið er at hava nýggju orðingarnar við til sáttmálasamráðingarnar í vár.

7. apríl vóru vit til hoyringar í rættarnevndini hjá Løgtinginum um uppskotið at loyva flóttum úr Ukraina at koma til Føroya. Felagið vísti á, at tørvur var á at hava skipað viðurskifti rundan um móttøkuna og greiðar ætlanir fyri, hvat síðan skuldi henda.

## Mai

Fyrst í mai var formaðurin á AIEJI-fundi (AIEJI er altjóðafelagsskapur fyri sosialnámsfrøðingar), har hann er aðalskrivari. Á fundinum var aðalfundurin hjá felagsskapinum fyrireikaður, og síðsta hond varð løgd á tilmælið um "kompetansuprofilin" hjá sosialnámsfrøðingum.

Kanning og fyribilsúrslit "Tíð til annað arbeiði" – fyrstu úrslitini frá kanningini av §10 í sáttmálanum fyri námsfrøðingar vóru løgd fyri nevndina. Her var tó bert talan um rá data, og endaliga úrslitið av kanningini verður ikki kunngjørt fyrr enn síðst í mars 2023.

17. mai høvdu vit eitt tiltak á Hotel Hilton fyri limir undir yvirskriftini "Hvussu er støðan hjá mær, tá eg skal frá við eftirløn?". Her greiddu umboð fyri Fíggjarmálaráðið og eftirlønarfelagið LÍV frá, hvussu støðan er hjá teimum, ið eru við at fyrireika seg til at fara frá vegna aldur.

## Juni

1. juni fylti felagið 40 ár, og var dagurin hildin við móttøku, har nýggja bókin "Pedagogar í Føroyum" varð givin alment út. Ein bók, sum Uni Arge hevur skrivað við støði í gomlum aðalfundarfrágreiðingum og tíðindasøgum úr miðlunum.

10. juni var fakfagnaður eisini hildin, og hóast vit høvdu væntað at sæð fleiri luttakarar, kundu omanfyri 100 luttakarar hóast alt fáa íblástur og kunnleika til ymisku virkisøkini hjá limum felagsins.

Juli og august vóru merktir av summarfrítíðini.

## September

6. til 9. september var AIEJI-kongress /aðalfundur, har Jógvan Philbrow bleiv afturvaldur sum aðalskrivari, og Benny Andersen, formaður í Socialpædagogerne í Danmark, varð afturvaldur sum forseti. Umframt valið av teimum báðum, vórðu nevndarlimir úr ymiskum londum valdir.

27.-29. september hevði Nordisk Lærerorganisationers Samråd (NLS) seminar í Reykjavík, har Pedagogfelagið var umboðað saman við Føroya Lærarafelag. Hetta seminarið snúið seg um framtíðar avbjóðingar hjá námsfrøðingum og lærarum.

## Oktober

Í Oktober vóru vit á vitjan á Heilsuskúlanum í Hovi, har vit fingu eina gjølliga frágreiðing um, hvussu

útbúgvingin er skipað, og hvørjar hugsanir tey hava um framtíðina.

19. oktober var kafekvøld í Klaksvík, har LÍV greiddi frá eftirlønarviðurskiftum og tryggingum, og Elin N. W. Tausen helt fyrilestur um "Hugflog og námsfrøði á Verkstaðnum". Felagið var fyrr um dagin til hoyring í trivnaðarnevnd Løgtingsins um oljuískoytið.

28. oktober skipaði Leiðararáðið fyri "landsleiðaradegi", ein dagur undir heitinum "Alt snýr seg ikki um teg" við Niels Overgaard.

## November

3. november hevði áhugabólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum limafund í Klaksvík, har ymisk umboð fyri dagstovnarnar í Klaksvík greiddu frá sínum virksemi, og aftaná var stutt kjak.

4. november hevði Fasti gerðarrættur tiltak fyri fakfeløg og arbeiðsgevarar. Tiltakið var ætlað sum eitt kunningartiltak.

5. november hevði Námsfrøðingaráðið evnisdag um sálarligt arbeiðsumhvørvi, hesin var hildin í Løkshøll í Runavík og hildu millum annað Suni Poulsen, sálarfrøðingur, og Súsanna Olsen, stjórnmálafrøðingur, fyrilestrar um evnið.

9. november bleiv løgtingsval útskrivað, og gjørdu vit saman við Fakfelagssamstarvinum eina lýsingaherðferð við krøvunum um, at arbeiðsvikan bleiv stytt, og at limagjald til fakfelag skal kunna trekkjast frá í skatti, soleiðis sum arbeiðsgevarar eisini kunnu draga síni limagjøld til arbeiðsgevarafeløg frá.

Pedagogfelagið sjálvt gjørdi eisini av at leggja áherðslu á, at starvsfólkatrot er á økinum, og varð hetta gjørt undir heitinum "Starvsfólkatrot hóttir vælferðina". Endamálið var at sóknast eftir politikarum, ið høvdu svar uppá, hvussu hesin trupulleikin skuldi loysast nú og í framtíðini.

15. november kallaðu vit inn til eykaaðalfund um keyp av frítíðarhúsi. Hesin var hildin í hølunum hjá Føroya Arbeiðarafelag í Stoffalág. Eykaaðalfundurin samtykti at geva nevndini heimild at keypa frítíðarhús. Nevndin hevur eftir hetta keypt frítíðarsmáttu í Vági, sum limir kunnu leiga. Limir hava havt atgongd síðan hálvan januar 2023.

17.-18. november var Norðurlendskur fakfelagsfundur fyri feløg, sum umboða sosialnámsfrøðiliga virkisøkið. Her blivu millum annað útbúgvingar og arbeiðsviðurskifti í teimum ymisku Norðurlondunum umrødd. Eftir fundin varð vitjað á Stíggi og Rásini í Runavík.

22.-23. november var stýrisfundur í Nordisk Lærerorganisationers Samråd (NLS) í Svøríki. Tað, sum sermerkti hendan fundin, var, at svensku feløgini á námsfrøðiliga økinum greiddu frá um teirra samanlegging av feløgum. Sviar hava havt eitt breitt felag umboðandi dagstovnaøkið, fólkaskúlaøkið og miðnám umframt eitt felag, sum bara hevur umboðað lærarar í fólkaskúlanum. Hesi eru nú løgd saman.

## Desember

1. desember blivu sáttmálarnir uppsagdir.

Frítíðarsmáttan í Vági varð keypt fyri stívliga eina millión krónur.

8. desember var Løgtingsval. Virksemið áðrenn og eftir løgtingsvalið hevur einamest snúð seg um at varpa ljós á ynskini hjá felagnum og Fakfelagssamstarvinum.

Valborg H. Hammer gjørdi av at fara úr aftur nevndini í desember, hetta vegna persónlig viðurskifti; í hennara stað er Harald Joensen, valdur tiltakslimur, komin inn. Hann situr í sessinum fram til næstu ferð, nevndarval er, og tað er í 2024.

## Januar

Fyrst í januar byrjaðu veruligu fyrireikingarnar til aðalfundin – at lýsa aðalfundin og at fyrireika møgulig val av ráðslimum. Samstundis skal aðalfundar-Pedagogblaðið fyrireikast.

Somuleiðis bleiv bókingarskipan sett í verk fyri frítíðarsmáttuna í Vági. Umleið 60 bókingar komu inn teir fyrstu 48 tímarnar.

18. januar var álitisfólkafundur, har flest øll álitisfólk møttu. Til viðgerðar vóru freistir til aðalfundin og komandi sáttmálasamráðingar.

22.-27. januar var nevndin á samráðingarskeið á "Konventum" – gamla LO-skúlanum í Helsingør. Saman við okkum vóru eisini umboð úr Starvsfelagnum og Akademikarafelagnum.

## Februar

1. februar var síðsta freist at koma við uppskotum um valevni til ráðini og uppskotum, ið skulu viðgerast á aðalfundinum.

## Samanumtikið

Av stórum málum hevur yvirtíðarmálið, ið felagið vann, fylt nógv. Í yrstu atløgu hava tænastumenn í felagnum fingið endurgoldið umleið 350.000 krónur tilsamans fyri vantandi yvirtíðargjøld.

Í løtuni eru vit í ferð við at gera krøv upp fyri tey sáttmálasettu, bæði hjálparfólk og námsfrøðingar. Her skulu øll, ið hava havt eina fulltíðarsetan í tíðarskeiðnum aftur til september 2018, og sum hava fingið útgoldið "meirtíð", venda sær til felagið, tí sannlíkt hava tey ikki fingið røttu lønina. Hóast vit vunnu yvirtíðarmálið í serliga gerðarrættinum, eru vit enn ósamd um, hvussu "uppspardir tímar" eiga at viðgerast, og arbeitt verður við at fáa greiðu á hesum.

Seinasta árið hevur eisini verið ávísur ágangur á álitisfólkaskipanina frá Almannaverkinum. Hesin ágangur hevur gjørt tað minni hugaligt at vera álitisfólk, tí Almannaverkið metir, at álitisfólkafundir ikki eru partur av álitisfólkaarbeiðinum, og vil tí ikki gjalda løn, tá álitisfólk møta, um tey ikki standa á vaktarskemanum.

Felagið hevur farna árið eisini arbeitt við virksemisætlanum hjá limum okkara í fólkaskúlanum. Her eru framvegis fleiri avbjóðingar, serliga við, at tey sum vera lønt eftir okkara sáttmála ikki fáa serliga nógva fyrireikingartíð. Hetta kemur best til sjóndar í serstovum, har arbeiðstíðin ikki samsvarar við arbeiðstíðina hjá lærarum, hóast undirvísingin er hin sama.

Umframt hetta hevur umsitingin svarað hópin av fyrispurningum og loyst ymisk mál fyri einstakar limir.

## Jógvan Philbrow:

# HAVNIN HEVUR IKKI STOVNS-PLÁSS TIL ØLL BØRNINI

**Formaðurin í Føroya Pedagogfelag undrast á, at Tórshavnar Kommuna raðfestir nýggj stovnspláss ovast, tá tað nóg illa ber til at fáa fólk til verandi stovnar. Hann mælir kommununi til at síggja veruleikan í eyguni og ásanna, at starvsfólkaorka er ikki til at bjóða stovnspláss til øll børnini, og hann heldur, at kommunan eigur at boða barnafamiljum, ið umhugsa at flyta til Havnar, frá hesum**



*Formaðurin í Pedagogfelagnum heldur, at Tórshavnar Kommuna skal spæla við opnum kortum og siga fólki, at kommunan ikki kann veita børnunum trygd fyri stovnsplássi*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

INGOLF S. OLSEN – PRESS

– Borgarstjórin og alt býráðið í Havn má viðurkenna veruleikan, og sum støðan er nú, er veruleikin tíverri, at Tórshavnar Kommuna hevur ikki stovnspláss til øll børnini. Tað hevur hon ikki, tí hon hevur ikki nóg mikið av starvsfólki at tryggja, at verandi stovnar altíð kunnu hava opið og liva upp til normeringarnar, sum kommunan sjálv hevur ásett.

Soleiðis sigur Jógvan Philbrow, nú tað aftur er kynt undir kjakið um støðuna á dagstovnaøkinum í

Tórshavnar Kommunu, og hann mælir borgarstjóranum og øllum, ið hava ábyrgd av dagstovnaøkinum í kommununi, til at vera erlig og kalla ein spaka fyri ein spaka.

## Starvsfólkatrot

Mikudagin 17. februar kjakaðust Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu, og Annika Olsen, fyrrverandi borgarstjóri, um støðuna á dagstovnaøkinum í kommununi. Her helt Heðin Mortensen uppá, at støðan generelt er góð, og at tað bara er tann eini stovnurin, ið elvir til alt kjakið – tað er dagstovnurin í Maritugøtu í Hoyvík.

Borgarstjórin legði dent á, at tað ikki eru pengar, sum vanta í á dagstovnaøkinum, men starvsfólkaorka. Tað er ein trupulleiki, sum kommunan ikki fær loyst, segði hann, men sum má loysast við at útbúgva fleiri námsfrøðingar, bæði við at taka nógv fleiri námsfrøðilesandi inn á Fróðskaparsetrið og kanska lata upp fyri fjarlestri eisini.

Jógvan Philbrow er samdur í, at tað skulu útbúgvast fleiri námsfrøðingar og tað ongantíð ov skjótt. Men hann er ikki samdur í, at trupulleikarnar á dagstovnaøkinum í høvuðsstaðarkommununi kunnu avmarkast til bara ein stovn.

## Hvør skal arbeiða?

Og hann undrast á, at bæði Heðin Mortensen og Annika Olsen, borgarstjórin undan honum, sum eisini var við í kjakinum, í næstu løtu bara gleivaðu upp um starvsfólkatrupulleikan og vóru samd um, hvussu nógvan skund tað hevði at útvega nýggj stovnsplass, millum annað við at byggja nýggjan barnagarð á Argjum og byggja út aðrastaðni.



*Borgarstjórin legði dent á, at tað ikki eru pengar, sum vanta í á dagstovnaøkinum, men starvsfólkaorka.*

– Hvør skal arbeiða har? Tey hava júst staðfest, at tað tróta námsfrøðingar og eisini hjálparfólk í ólukkumát, og so ætla tey sum tað fyrsta at útvega fleiri stovnspláss. Sjálvt um tey ikki hava skyldina av, at vit mangla námsfrøðingar í Føroyum, so er trupulleikin har kortini. Tað er altso ikki av ongum, at vit javnan hoyra um stovnar í Havn, sum mugu ringja eftir foreldrunum at koma eftir børnunum í ótíð, tí tað eru ov fá starvsfólk til at hava stovnin opnan, sigur Jógvan Philbrow.

– Eg skilji einfalt ikki, hvussu tey hugsa. Men tilflytarar blíva í hvussu er lumpaðir, tá kommunan billar teimum inn, at hon syrgir fyri stovnsplássi til børnini. Veruleikin er, at kommunan hevur ikki plássini, tí hon hevur ikki starvsfólkini til tey, leggur hann afturat.

***Les eisini hvøssu atfinningarnar hjá forkvinnuni í Leiðararáðnum í greinini "Nei takk til fleiri herðaklapp".***

# Formaðurin er bjartskygdur

**Stórt trot er á námsfrøðingum, lønin er ov lág, og nógv námsfrøðilig arbeiðspláss lýða undir strongd vegna vánaligar arbeiðsumstøður. Námsfrøðiligi arbeiðsmarknaðurin hevur tað alt annað enn gott, men Jógvan Philbrow, formaður í Pedagogfelagnum, væntar betri dagar fyri framman, tí arbeiðsgevararnir viðurkenna nú, at støðan er soleiðis, og hann væntar avgjørt, at nýggja samgongan fer at halda síni nógvu lyfti, millum annað um lønarlyft, styttri arbeiðsviku og útbúgving av fleiri námsfrøðingum**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

– Eg eri sjálvandi eins og øll onnur sera ørkymlaður av støðuni, sum hon er, men eg vænti avgjørt, at samgongan fer at halda síni lyfti, og eg vænti eisini, at meira fer at spyrjast burtur úr sáttmálasamráðingunum hesa ferð í mun til tað, vit hava verið von við seinastu nógvu árini.

Tað sigur Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag, undan aðalfundinum 11. mars.

21. februar handaði Dagstovnaráðið Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, og Tórbirni Jacobsen, formanni í Kommunufelagnum, álitið "Fyri barnsins besta", ið hevur eina rúgvu av tilmælum, sum øll meira ella minni stuðla undir sjónarmið hjá Føroya Pedagogfelag.

## Mótparturin flutt seg

Nýggja álitið, sum landsstýri og kommunur sjálv hava bílagt, ger ikki útgangsstøðið fyri sáttmálasamráðingunum verri, heldur formaðurin, og hann sigur, at hann eisini frammanundan var vónríkur, tí arbeiðsgevarasíðan longu tykist hava flutt seg nógv í mun til seinast, tá tað snýr seg um sjálvt grundarlagið undir samráðingunum.

– Nú sær út til, at vit í minsta lagi kunnu verða samd um fakta, og tað er ein avgerandi fortreyt fyri at kunna hava seriøsar samráðingar og flyta nakað. Mann skuldi trú, tað var lygn, men seinast sótu vit veruliga og kjakaðust um, um vit nú høvdu eitt veruligt starvsfólkatrot ella ikki. Arbeiðsgevararnir vildu ikki góðtaka tað sum nakað argument fyri stórvegis broytingum.

– Tað er sanniliga broytt.



*Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag, væntar betri dagar fyri framman, bæði tá tað snýr seg um úrslit av sáttmálasamráðingum og politiskar loysnir til frama fyri námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðin*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

Borgarstjórin í Havn, sum hevur eina drúgva fortíð sum formaður í bæði Kommunufelagnum og Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, tvíheldur nú í almennum kjaki um, at starvsfólkatrotið er rótin til allar aðrar trupulleikar á dagstovnaøkinum, og hann viðurkennir eisini, at lønirnar eru ov lágar, sigur Jógvan Philbrow.

## Vallyftini halda

Harafturat staðfestir formaðurin, at gyltu vallyftini hjá teimum báðum stóru samgonguflokkunum til námsfrøðiliga økið og umsorganarfakini sum heild í stóran mun eisini komu at standa í samgonguskjalinum, tá avtornaði.

– Nógv okkara tóku helst øll lyftini við einum ávísum fyrivarni, tí politikarar hava lyndi at lova alt møguligt undan vali, sum teir so ikki klára at halda, og vit eru eisini von við at verða kyrrað við stórum vælvilja, sum so ikki verður til nakað kortini. Men nú vænti eg veruliga, at okkurt fer at henda, sigur Jógvan Philbrow.

Tað eru serliga lyftini um lønarlyft, styttri arbeiðsviku og útbúgving av fleiri námsfrøðingum, sum hann sipar til.

### Lønarlyft

Enn veit ongin at siga, hvussu stórt lønarlyft, talan verður um. Tjóðveldi segði undan valinum, at tey vildu brúka 50 milliónir krónur tilsamans at lyfta tær lægstu lønirnar, men onki tal er sett á í fyrsta fíggjarlógaruppskotinum hjá nýggju samgonguni – tað er uppskotið fyri verandi fíggjarár. Talan kann tó verða um torføra politiska telving og samráðingar at finna rætta býtið av einari eyka lønarpulju ímillum lægst løntu lønarbólkarnar.

– Fáa vit lyft sjálvt lønarstøðið hjá okkara limum, so tað munar, og útlit verða fyri, at tað fara at verða fleiri hendur, sum frá líður, so vænti eg avgjørt, at hugurin at arbeiða við námsfrøði eisini fer at økjast. Núverandi støðan á námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðinum styggir jú nógv fólk burtur, sum annars høvdu havt hug til eina námsfrøðiliga lívsleið, sigur Jógvan Philbrow.

### Smidligari atgongd at lesa

Tað tekur fýra ár at útbúgva seg til námsfrøðing á Fróðskaparsetrinum, og tá skalt tú fyrst hava tikið eina miðnámsskúlaútbúgving. Tí veit formaðurin í Pedagogfelagnum eisini, at tað fer at taka sína tíð at basa starvsfólkatrotinum, sum í nógv ár bara hevur fingið loyvi at vaksa seg stórt, uttan at veruligar politiskar royndir eru gjørdar at basa tí – fyrr enn nú.

Hann heldur tó, at tað saktans ber til at trýsta á spitaran fyri at skunda undir tilgongdina av nýggjum námsfrøðingum.

– Nú verður so ein eyka flokkur av námsfrøðilesandi tikin inn á Fróðskaparsetrið eftir summarferiuna, og eg haldi ikki, at tað hevði gjørt nakað, um tað heldur vóru tveir. Men hóast tað, so ganga tað fýra ár, áðrenn nakar av hesum, ið byrja at lesa í summar, koma út sum námsfrøðingar í hinum endanum.

– Hinvegin so vita vit, at fleiri teirra, sum í dag arbeiða á námsfrøðiligum arbeiðsplássum, men ikki hava námsfrøðiliga útbúgving, fegin vildu farið undir útbúgvingina, um tey fingu meritt (góðskriving, blðm.) fyri drúgvar arbeiðsroyndir á økinum, og serliga, um ein partur kundi verið tikin sum fjarlestur. Tað er galdandi fyri bæði námsfrøðiútbúgvingina á Fróðskaparsetrinum og námsfrøðihjálparaútbúgvingina á Heilsuskúlanum í Hovi, sigur Jógvan Philbrow. Og tað mest umráðandi er at syrgja fyri, at útbúgvingin í Hovi fer at geva beinleiðis atgongd at lesa víðari til námsfrøðing á Fróðskaparsetrinum, sigur Jógvan Philbrow.

### Støðið skal haldast

Hann leggur tó dent á, at sjálvt um atgongdin at lesa til námsfrøðing gerst smidligari, so má tað á ongan hátt merkja, at fakligi støðið í útbúgvingini lækkar.

– Námsfrøðiútbúgvingin er ein akademisk útbúgving, og tað skal hon blíva við at vera, og tað fer eisini at vera reglan, at tú lesur til námsfrøðing á Setrinum eftir studentaeksamiu ella aðra miðnámsskúlaútbúgving. Men tað er eisini í lagi, at drúgvar arbeiðsroyndir á økinum í ávísan mun telja við, sigur Jógvan Philbrow.

### Styttið vikuna í einum

Formaðurin í Pedagogfelagnum fegnast um, at samgongan ætlar at stytta arbeiðsvikuna niður í 37 tím-




ar, men hann heldur tó, at samgongan her letur møguleikan at fáa fleiri fuglar við einum skoti gleppa sær av hondum, tí hon ætlar at stytta vikuna í stigum yvir seks ár.

– Eg haldi avgjørt, at arbeiðsvikan skuldi verið stytt í einum, tí tá hevði tú samstundis fingið minkað mundandi um aðrar trupulleikar á arbeiðsmarknaðinum, ikki minst starvsfólkatrotið á námsfrøðiligu arbeiðsplássunum.

– Vit halda tað vera ein trupulleika, at so nógv í okkara faki arbeiða niðursetta tíð. Fleiri teirra, sum nú gera tað eftir egnum ynski, høvdu óivað viljað farið uppá fullan brøk, um vikan beinanvegin varð stytt niður í 37 tímar. Og arbeiðsplássini, sum í dag seta fólk í parttíðarstørv fyri at fáa vaktartalvurnar at passa, kunnu tá í nógv størri mun fáa roknistykkið at ganga upp við at konvertera parttíðarstørv til fullan brøk.

Sambært samgonguskjalinum skulu trípartasamráðingar leggja endaliga leistin fyri styttingini av arbeiðsvikuni, men tað stendur, at tað skal gerast við einum tíma annaðhvørt ár.

*– Nú sær út til, at vit í minsta lagi kunnu verða samd um fakta, og tað er ein avgerandi fortreyt fyri at kunna hava seriøsar samráðingar og flyta nakað. Mann skuldi trú, tað var lygn, men seinast sótu vit veruliga og kjakaðust um, um vit nú høvdu eitt veruligt starvsfólkatrot ella ikki*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# DAGSTOVNARÁÐIÐ MÆLIR TIL AT BERA SKJÓTT AT

**Einføld høvuðrokning sigur, at tað ikki er løtuverk at loysa starvsfólkatrupulleikarnar á dagstovnaøkinum, ásannar Dagstovnaráðið, men leggur dent á, at tað hevur skund at taka stig til at fáa til vega fleiri námsfrøðingar og hjálparfólk og at fáa tey at støðast. Ráðið hevur júst latið landsstýrismanninum í barna- og útbúgvingarmálum og formanninum í Kommunufelagnum tilmælið ”Fyri barnsins besta”**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Síðan september 2021 hevur Dagstovnaráðið arbeitt við at gera tilmæli til landsmyndugleikar og kommunur um, hvussu avbjóðingarnar við stóra trotinum á dagstovnanámsfrøðingum best kunnu møtast.

Nú er arbeiðið liðugt, og 21. februar fingu Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður i í barna- og útbúgvingarmálum, og Tórbjørn Jacobsen, borgarstjór í Runavíkar Kommunu og formaður í Kommunufelagnum, tilmælið, sum hevur heitið ”Fyri barnsins besta” handað. Ella rættari tilmælini, tí talan er um 15 tilmæli.




Í innganginum staðfestir Dagstovnaráðið, at tað í dagstovnunum kring landið í allar flestu førum ikki ber til at halda ásetingarnar í dagstovnalógini um, at í minsta lagi tveir triðingar av starvsfólkunum skulu vera námsfrøðingar. Víst verður til eina uppgerð hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum fyri 2020 fyri alt landi, sum vísir, at av 922 námsfrøðiligum ársverkum á dagstovnaøkinum tá vóur bara 440 mannað við námsfrøðingum – tað er 48 prosent – meðan hjálparfólk mannaðu hini 482.

Dagstovnaráðið staðfestir eisini, at útskiftinging av bæði námsfrøðingum og hjálparfólki er stór, og at starvsfólkatrotið hevur verið so stórt summa staðni seinastu árini, at neyðugt hevur verið at lata stovnar aftur partar av degnum.

Dagstovnaráðið heldur, at tað besta dagstovnalívið fyri børnini er, um tveir triðingar av starvsfólkunum ella meira eru námsfrøðingar, eins og tað er ásett í dagstovnalógini.

Tað ikki ber til at røkka hesi idealstøðuni tey næstu árini, ásannar ráðið, men leggur dent á, at stig mugu takast á fleiri mótum at fáa til vega fleiri námsfrøðingar og hjálparfólk og fáa tey at støðast, og at tað hevur skund.

"Fyri komandi ættarlið er umráðandi, at politikarar taka neyðug stig, fyri at dagstovnar kunnu menna og styrkja tað barnaumhvørvið, ið dagstovnalógin, námsfrøðiligu stevnumiðini og barnarættindasáttmálin áseta", skrivar Dagstovnaráðið millum annað.

Í næsta Pedagogblað verður meira gjørt burtur úr tilmælinum "Fyri barnsins besta".

## Tey 15 tilmælini

**Í sínum tilmælisriti "Fyri barnsins besta" hevur Dagstovnaráðið 15 ítøkilig tilmæli, sum eru býtt í fýra høvuðsevni: A. Børn hava rætt til, B. Útbúgving, C. Nøktandi arbeiðsumstøður og D. Menningareind fyri dagstovnar.**

### Tilmælini eru hesi:

**A. Børn hava rætt til**

1. Heildarætlan fyri dagstovnaøkið
2. Hóskandi starvsfólkaorka og støðd á barnabólkum
3. Krøv til innandura og uttandura viðurskifti

**B. Útbúgving**

4. hugi fyri námsfrøðingalestrinum
5. Fyrireikingarskeið til námsfrøðingalestur
6. Námsfrøðihjálparaútbúgving
7. Tveir flokkar á námsfrøðingaútbúgvingini
8. Eftirútbúgving og skeið til starvsfólk á dagstovnaøkinum
9. Karmar til menningar- og trivnaðarátøk
10. Góðskriving av førleikum og avriksflutningur

**C. Nøktandi arbeiðsumstøður**

11. Tíð til námsfrøðiligu uppgávurnar
12. Dagføring av lønini so samsvar er millum útbúgving, ábyrgd og løn
13. Dagstovnanámsfrøðingar og hjálparfólk arbeiða fulla tíð
14. Vegleiðing av nýútbúnum námsfrøðingum og hjálparfólkum

**D. Menningareind fyri dagstovnar**

15. Menningareind fyri dagstovnar í Føroyum

## Dagstovnaráðið

**Limirnir í Dagstovnaráðnum – aftanfyri hvørt navnið stendur, hvønn viðkomandi umboðar.**

**HILDUR PATURSSON,** forkvinna, Barna- og útbúgvingarmálaráðið
**ANNIKA ANTONIUSSEN,** Fróðskaparsetur Føroya
**IVONNA A. S. JOHANSEN,** Fróðskaparsetur Føroya
**EDDA HJARTVARSDÓTTIR,** Føroya Pedagogfelag
**JULIANNA NÆS,** Føroya Pedagogfelag
**FRÓÐI JACOBSEN,** Javnstøðunevndin
**EYÐUN CHRISTIANSEN,** Kommunufelagið
**ÓLI RUBEKSEN,** Kommunufelagið

Skrivari hjá Dagstovnaráðnum er **BRYNHILD HØGNADÓTTIR,** Kommunufelagið



# SKRÁIN TIL AÐALFUND FELAGSINS 11. MARS 2023

**Innskriving til aðalfundin byrjar klokkan 11.00.**

Leiðararáðið, Námsfrøðingaráðið og Hjálparfólkaráðið byrja sínar fundir klokkan 12.30 við hesi skrá:

A. Val av fundarstjóra og skrivara

B. Ásetan av fundarskipan fyri aðalfundin

C. Frágreiðing frá ráðnum

D. Framløga av roknskapi og fíggjarstøðu til kunningar

E. Framløga av fíggjarætlan og virksemisætlan til kunningar

F. Viðgerð av innkomnum uppskotum

G. Kunngerð um hvør er valdur í ráðini

H. Ymiskt

Námsfrøðingaráðið, skuldi hava tveir ráðslimir, her hevur Unn Jarnskor Ellingsgaard, bjóðað seg fram, og verður hon vald uttan atkvøðugreiðslu.

Leiðararáðið skuldi hava tveir ráðslimir, og eingin hevur bjóðað seg fram.

Serligt forum verður fyri tey lesandi.

Tá ráðsfundirnir eru lidnir, er steðgur til 15.00.

Klokkan 15.00 byrjar felagsaðalfundurin við hesi dagskrá:

Gestarøðari: Djóni Nolsøe Joensen, barna- og undirvísingarmálaráðharri

A. Val av fundarstjóra og skrivara

B. Ásetan av fundarskipan fyri aðalfundin

C. Frágreiðing frá nevndini til góðkenningar

D. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar

E. Framløga av felagsins fíggjarætlan til kunningar

F. Viðgerð av ætlaða virksemi felagsins

G. Val av grannskoðarum

H. Viðgerð av innkomnum uppskotum og ásetan av limagjaldi.

Nevndin hevur tvey uppskot til lógarbroytingar við til aðalfundin í ár at taka støðu til, undir punkt H. Viðgerð av innkomnum uppskotum og ásetan av limagjaldi.

### Uppskot 1:

Broyting í §8. Aðalfundur, nýtt stk 7. Eru ov fá valevni til, at eykalimir

eru, kann aðalfundurin skjóta upp og velja upp til tríggjar limir á aðalfundinum. Atkvøðast kann tá á sjálvum aðalfundin. 1., 2. og 3 valdur verður eftir atkvøðutalinum.

ENDAMÁL:
Verandi áseting leggur upp til, at nóg mikið av limum bjóða seg fram til nevnd og sum ráðslimir. Hetta hevur nú víst seg ikki at virka, soleiðis sum ætlað var, og er ynskið tí, at tað skal bera til, at aðalfundurin hjá ráðunum og øllum felagnum fær møguleika at velja eykalimir inn.

## Uppskot 2:

Broyting í §8. Stk 4.
"Ársaðalfundurin verður hildin á hvørjum ári áðrenn 15. apríl. Nevndin skal lýsa aðalfundin í føroysku bløðunum í seinasta lagi 15. januar."

Verður broytt til:
"Broyting í §8. Stk 4.
"Ársaðalfundurin verður hildin á hvørjum ári áðrenn 15. apríl. Nevndin skal lýsa aðalfundin á heimasíðu felagsins í seinasta lagi 15. januar."

ENDAMÁL:
Av tí at prentað tíðindabløð ikki røkka út til øll og gerast alsamt færri í tali, verður mett, at lýsingarhátturin eigur at lagast til nýggju støðuna, soleiðis at allir limir hava møguleika at fáa kunning um, nær og hvar aðalfundur verður.

I. Fráboðan um hvør er valdur í nevnd og sum eykalimur (ikki í ár)

J. Fráboðan um hvør er valdur til formann triðja hvørt ár (ikki í ár)

K. Ymiskt

Væntandi byrjar borðhaldið klokkan 19.00.





*– Vit skríggja eftir at fáa starvsfólk til verandi stovnar, og so tosa ráðandi kommunalpolitikarar í ramasta álvara um at byggja fleiri. Leiðarar og eisini starvsfólk á gólvinum trola ígjøgnum starvslýsingar at leita eftir størvum á heilt øðrum økjum, ella tey fella frá av strongd – strongd av alt ov stórari arbeiðsbyrðu, og sanniliga eisini av sálarligum maktarloysi og kroniskt ringari samvitsku, tí vit hava ikki neyðuga yvirskotið at fáa nøktandi námsfrøðiliga fakligheit við í okkara arbeiði*

*Mynd: Kári við Rættará*

**Forkvinnan í Leiðararáðnum:**

# Nei takk til fleiri herðaklapp

**Mirjam Johannesen er móð inn at sálini av at tosa fyri deyvum politikaraoyrum um, hvat tørvar mest at gera á dagstovnaøkinum, tí tað hevur hon gjørt tey seinastu 12-15 árini. Hon er forkvinna í Leiðararáðnum hjá Føroya Pedagogfelag, og sigur, at vónloysi er orðið, sum best lýsir huglagið hjá nógvum dagstovnsleiðarum – men tað er als ikki bara galdandi fyri stovnsleiðararnar í Havn, leggur hon dent á**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Fult er, áðrenn yvir flýtur, sigur orðatakið, og hjá Mirjam Johannesen, forkvinnu í Leiðararáðnum hjá Føroya Pedagogfelag, fleyt bikarið yvir, tá hon lurtaði eftir Breddanum í Kringvarpinum mikudagin 17. februar. Í sendingini kjakaðust Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu, og Annika Olsen, býráðslimur og fyrrverandi borgarstjóri, um støðuna á dagstovnaøkinum í kommununi, sum aftur av álvara er komin í andglettin.

– At borgarstjórin bagatelliseraði støðuna, og fekk tað til, at tað bara var tann eini stovnurin í kommununi, sum hevði stórar trupulleikar, tað koyrdi meg ikki um koll, og eg helt, at fyrrverandi borgarstjórin hóast alt royndi at lýsa veruligu trupulleikarnar á økinum. Men so leyp ketan totalt av hjá báðum, tí nú var tað knappliga mest umráðandi í snarheit at byggja ein nýggjan stovn, útbyggja aðrar og lata meira enn 100 nýggj stovnspláss upp.

– Eg bleiv so karvandi óð, tá tey fóru at tosa um tað, tí er tað nakað, sum IKKI hevur skund at gera í Tórshavnar Kommunu, so er tað at lata fleiri stovnspláss upp á dagstovnaøkinum. Eg spyrji bara, hvør skal arbeiða har, og hvat skal tað námsfrøðiliga innihaldið vera, sigur Mirjam Johannesen.

## Leggið tykkum fløt

Hon settist við knappaborðið og skrivaði eitt uppslag á Facebook, sum síðan er deilt 38 ferðir.

Uppslagið hjá Mirjam Johannesen er ein áheitan á bæði landspolitikarar og kommunalpolitikarar um at

leggja seg flatar í eyðmýkt og lurta og læra av tí, sum tey, ið arbeiða á dagstovnaøkinum og foreldrini, hava at siga. Hon staðfestir, at batar á dagstovnaøkinum ikki hava verið nóg høgt raðfestir í fleiri ár, men at tað júst eru politikararnir, sum kunnu gera munin, og hon endar uppslagið við hesum orðum:

"Nei, tit kunnu ikki ganda heitar hendur, men tit kunnu gera batar, sum veruliga hjálpa. Tit kunnu seta fleiri námsfrøði-flokkar inn á Setrið, tit kunnu betra lønina, eftirlønina og fyrireikingina av hesum týdningarmikla arbeiðinum. Tit kunnu raðfesta at brúka tykkara tíð at tosa um okkum, tit kunnu raðfesta okkum fram um tunlar og hallir, asfalt og betong."

## Fella frá av strongd

Mirjam Johannesen heldur, at tosið nú um, at tað hevur skund at lata fleiri stovnspláss upp í Havn, bara er ein staðfesting av, at politikararnir enn onki hava fatað.

– Vit skríggja eftir at fáa starvsfólk til verandi stovnar, og so tosa ráðandi kommunalpolitikarar í ramasta álvara um at byggja fleiri. Leiðarar og eisini starvsfólk á gólvinum trola ígjøgnum starvslýsingar at leita eftir størvum á heilt øðrum økjum, ella tey fella frá av strongd – strongd av alt ov stórari arbeiðsbyrðu, og sanniliga eisini av sálarligum maktarloysi og kroniskt ringari samvitsku, tí vit hava ikki neyðuga yvirskotið at fáa nøktandi námsfrøðiliga fakligheit við í okkara arbeiði. Nú eri eg í Leiðararáðnum, og eg má tíverri siga, at vónloysi man vera orðið, ið best lýsir huglagið hjá nógvum dagstovnsleiðarum í løtuni.

Mirjam Johannesen er sjálv sjúkrameldað vegna strongd frá sínum starvi sum leiðari á dagstovninum Sólareygað í Havn.

– Ja, eg fór knappliga eisini niður við flagginum og fyri fyrstu ferð í lívinum mátti eg langtíðarsjúkrameldast, sigur Mirjam Johannesen.

## Ansing og ikki námsfrøði

Forkvinnan í Leiðararáðnum vísir á, at um ein kommuna ætlar at trossa veruleikan upp á handa mátan, so gongur hon tilvitað ímóti dagstovnalógini, um hon ikki kallar barnið okkurt heilt annað enn dagstovn.

– Tá eg fari í Bónus, og har situr ein smádrongur við kassan, so eri eg blíð og góð við hann og krevji ikki, at hann veit hvar lambsryggirnir liggja, ella at hann veit, hvat Rizla tubbakspappír er ella okkurt annað merkiligt. Og farið eg inn á eina bensinstøð ella eitt bakarí, har tað verður tosað enskt, ja, so tosi eg enskt, tí eg virði tey og teirra førleikar, og ongin lóg krevur nakað annað av teimum.

– Men vit á dagstovnunum eru regulerað av eini dagstovnalóg, sum krevur námsfrøðiliga fakligheit. Tað krevja foreldrini sjálvandi eisini. So eg spyrji, hvaðani skal fakligheitin koma til tey nýggju stovnsplássini, býráðspolitikararnir í Havn ætla at byggja. Í hvussu er tað so, at fáa tey námsfrøðiliga fakligheit til nýggj stovnspláss, so hvørvur hon onkra aðrastaðni. Tí vit fiska øll úr sama grunni, og har er ongin tilgongd.

– Hetta hongur ikki saman, og tí havi eg eisini sagt, at um fleiri stovnspláss skulu latast upp í Havn nú, so skulu tey ikki kalla tað



*– Vit fáa ofta at vita, hvussu fantastisk, vit eru, og alt tað góða arbeiðið, vit gera, sum samfelagið ikki kann vera fyri uttan. Men eg vil ikki hoyra tað longur, eg orki tað ikki – nei takk, gev okkum handling heldur enn herðaklapp og løn í himmiríki*

*Mynd: Kári við Rættará*

dagstovnar, tí dagstovnar skulu halda seg til dagstovnalógina. So tað má eita okkurt annað, okkurt, sum ikki er námsfrøðiligt – ein "ansingarstovnur" kanska, sigur Mirjam Johannesen.

– Politikararnir gera hetta fyri at tekkjast foreldrum, so uppaftur fleiri familjur flyta til høvuðsstaðin. Men aftur fyri verða vit og okkara fakligheit svartiper, og í veruleikanum verða báðir partar við sviðusoð, vit og foreldrini, tí foreldrini halda seg jú fáa meira enn bara ansing – tey vænta og krevja fakligheit, leggur hon afturat.

## Sein á sjóvarfallinum

Hon er fegin um batarnar, sum nýggja samgongan hevur lovað, men samstundis sera hørm um, at politikararnir eru so seinir á sjóvarfallinum og ikki fyri nógvum árum síðan fóru undir at gera tað, sum var neyðugt at gera, og sum hon og onnur ferð eftir ferð hava gjørt vart við – heldur enn bara at lata dagstovnaøkið forfella.

– Tað kundi verið sloppið undan, at støðan bleiv so ring, sum hon er. Tí tað er hon, men siga vit tað hart, sum eg geri nú, so fáa vit ákoyringar fyri bara at vera negativ og fyri at tosa dagstovnaøkið niður heldur enn upp. Tað fáa vit ofta at vita, at vit mugu vera positiv og tosa hetta upp, men tað eru altso ikki vit, sum bara hava latið staðið til og latið vera við at gera alneyðugar raðfestingar, sigur Mirjam Johannesen.

## Kundu verið 100 fleiri

Hon fýlist millum annað á, at upptøkan av námsfrøðilesandi á Fróð-



skaparsetrinum ikki er økt fyri nógvum árum síðan.

– Tað er blivið lovað nærum á hvørjum ári, at nú skal ein eyka flokkur takast inn, men onki er hent. Vónandi verður lyftið um at taka ein eyka flokk inn í summar hildið hesa ferð. Men tað ganga fýra ár, áðrenn nakar av teimum kemur til arbeiðis. Vit hava rópt upp um hetta í áravís, og um tað bleiv lurtað eftir okkum fyri til dømis átta árum síðan, so vóru fýra eyka flokkar komnir undan nú, og tað høvdu verið okkurt um 100 námsfrøðingar fleiri á arbeiðsmarknaðinum, sigur Mirjam Johannesen.

## Ikki bara í Havn

Hóast tað serliga er støðan á dagstovnaøkinum í Havn, sum er í andglettinum, so leggur forkvinnan í Leiðararáðnum dent á, at trupulleikarnir við vantandi raðfesting als ikki eru avmarkaðir til Tórshavnar Kommunu.

– Nú arbeiði eg sjálv í Havn, og tað var kjakið um støðuna í Havn, sum fekk mítt bikar at flóta yvir. Starvsfólkatrotið er størst her, og tí eru trupulleikarnar eisini mest sjónligir her. Men vantandi hugurin at raðfesta korini hjá starvsfólkunum á dagstovnaøkinum er generellur fyri alt landið.

*Tað fáa vit ofta at vita, at vit mugu vera positiv og tosa hetta upp, men tað eru altso ikki vit, sum bara hava latið staðið til og latið vera við at gera alneyðugar raðfestingar, sigur Mirjam Johannesen*

*Mynd: Kári við Rættará*


Mirjam Johannesen
17. Februar kl. 19:00 ·

Góðu kommunalpolitikkarar, og landspolitikkarar, anstøða og samgonga . Leggið tykkum fløt!!... í eyðmýkt! lurtið og lærið!

Spyrjið okkum, sum arbeiða á dagstovnaøkinum hvat vit veruliga hava tørv á, vitjið okkum, tosið við okkum og lurtið eftir okkum!! tosið við foreldrini, lurtið og lærið!

Raðfestingin fyri at gera munandi batar á dagstovnaøkinum hevur ikki verið til staðar í fleiri ár.

Tit politikkarar kunnu gera mun!
Nei tit kunnu ikki ganda heitar hendur, men tit kunnu gera batar sum veruliga hjálpa . Tit kunnu seta fleiri námsfrøði-flokkar inn á Setrið, tit kunnu betra lønina, eftirlønina og fyrireikingina av hesum týdningarmikla arbeiðnum. Tit kunnu raðfesta at brúka tykkara tíð at tosa um okkum, tit kunnu raðfesta okkum framum tunlar og hallir, asfalt og betong.

*Facebookuppslagið hjá Mirjam Johannesen, har hon biður politikararnar vera eyðmjúkar og lurta eftir starvsfólkunum, er deilt 38 ferðir*

– Tað eru nógvir stovnar á bygd, har starvsfólk og børn trívast, og øll eru glað – í hvussu er at síggja til – men eisini har eru lønirnar alt ov lágar, og tað eru eisini teir fægstu stovnarnir á bygd, um nakar, sum klárar at halda ásetingina í dagstovnalógini, at tveir triðingar av starvsfólkunum skulu vera námsfrøðingar, sigur hon.

## Sleppa sær undan

Mirjam Johannesen heldur, at um kommunurnar veruliga meintu allan vælviljan, tær siga seg hava mótvegis starvsfólkunum á dagstovnaøkinum, so var lagamanni hjá hvørjari einstakari kommunu at vísa tað í verki.

– Vit fáa ofta at vita, hvussu fantastisk, vit eru, og alt tað góða arbeiðið, vit gera, sum samfelagið ikki kann vera fyri uttan. Men eg vil ikki hoyra tað longur, eg orki tað ikki – nei takk, gev okkum handling og sømilig kor heldur enn herðaklapp og løn í himmiríki.

– Nú, tá Løgtingið ætlar at lyfta lønarstøðið, eru øll knappliga samd um, at lønirnar eru ov lágar, eisini kommunalpolitikararnir. Men hví hava teir so ikki langt síðan sjálvir hækkað námsfrøðingalønirnar og latið viðbøtur, har tað er náttúrligt? Nei, tá sleppa teir sær undan og vísa til sáttmálan, men talan er um ein minstulønarsáttmála, so onki er í vegin fyri, at til dømis Tórshavnar Kommuna bjóðar hægri løn, tá nú trupulleikarnir eru so eyðsýndir her, og borgarstjórin sigur jú, at pengar ikki eru nøkur forðing, sigur hon.

## Ynski um viðbøtur

Viðbøtur av ymiskum slag kundi verið eitt hent amboð at havt, heldur Mirjam Johannesen – í hvussu er sum eitt plástur á sárið – tá arbeiðsuppgávurnar fara út um tað, sum starvsfólkini reelt eru sett í starv at gera.

Tað verður eitt nú lagt nógv eyka arbeiði á námsfrøðingarnar og tey royndu hjálparfólkini orsakað av starvsfólkatrotinum. Millum annað ger skeiva býtið ímillum námsfrøðingar og hjálparfólk á stovnunum, umframt at útskiftingin av hjálparfólkum er nógv títtari samanborið við námsfrøðingarnar, at nógv tíð skal brúkast uppá upplæring.

– Hjálparfólkini eru sum oftast stak dugnalig, men ongin dugir alt bein-



*– Nú, tá Løgtingið ætlar at lyfta lønarstøðið, eru øll knappliga samd um, at lønirnar eru ov lágar, eisini kommunalpolitikararnir. Men hví hava teir so ikki langt síðan sjálvir hækkað námsfrøðingalønirnar og latið viðbøtur, har tað er náttúrligt? Nei, tá sleppa teir sær undan og vísa til sáttmálan, men talan er um ein minstulønarsáttmála, so onki er í vegin fyri, at til dømis Tórshavnar Kommuna bjóðar hægri løn, tá nú trupulleikarnir eru so eyðsýndir her*

*Mynd: Kári við Rættará*

anvegin. Vit læra tey nógv av tí praktiska arbeiðnum og eisini tað grundleggjandi námsfrøðiliga arbeiðið, so sum læruna um trygt tilknýti, relasjónsarbeiði, um týdningin av góða foreldrasamstarvinum og sovorðið.

– Tað er bæði rætt og rímiligt, at námsfrøðingar og roynd hjálparfólk fáa viðbót fyri upplæring, og tað eru fleiri onnur dømi um arbeiðsuppgávur, har viðbøtur eftir mínum tykki eiga at verða. Í øllum øðrum faklærdum yrkjum er tað ein sjálvfylgja, at viðbøtur verða lætnar fyri tað, sum má roknast at liggja uttanfyri tað vanliga arbeiðið, sigur Mirjam Johannesen.

# Samgongan bindir seg við lyftum

**Stytting av arbeiðsvikuni, lønarlyft, skattalætti, normeringar, upptøka av einum eyka flokki at lesa námsfrøði og lættari atgongd at nema sær námsfrøðiliga útbúgving – tað stendur alt samalt í samgonguskjalinum**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Politisku lyftini um munagóðar broytingar á námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðinum hava verið nógv ígjøgnum árini, men tað er avmarkað, hvat er sæst aftur av teimum, tá skiftandi samgonguskeið eru runnin.

Men nýggja samgongan hevur bundið seg at fremja stórar broytingar, við at skriva tær í sjálvt samgonguskjalið.

Í partinum um arbeiðsmarknað verða lyftini um lønarlyft, skattalætta og stytta arbeiðsviku gjørd bindandi longu í teimum fyrstu brotunum, sum eru soljóðandi:

“Framskrivingar vísa, at tørvur verður á væl meiri fólki á umsorganarøkjunum komandi árini. Samstundis eru lønirnar á júst hesum økjum so lágar, at tað er trupult at fáa nóg nógv fólk. Tí vil samgongan tryggja teimum lægst løntu bólkunum á hesum økjum eitt lønarlyft, eins og skattastigin verður broyttur fyri at økja arbeiðsútboðið.

Arbeiðsvikan verður stytt niður í 37 tímar. Trípartasamráðingar verða tiknar upp um at stytta arbeiðsvikuna við einum tíma annaðhvørt ár, til hon er komin niður á 37 tímar. Arbeiðsvikan verður skipað við lóg.

Almenni arbeiðsmarknaðurin skal skipast soleiðis, at møguleikin at arbeiða fulla tíð kann tryggjast.”

Í partinum um dagstovnaøkið bindir samgongan seg til at útbúgva fleiri námsfrøðingar og lætta atgongdina til útbúgving. Normeringar á dagstovnunum verða eisini nevndar, men ikki við nøkrum bindandi lyfti, tí tað er eitt tak, sum má takast saman við kommununum, ið umsita dagstovnarnar.

Parturin um dagstovnaøkið í samgonguskjalinum er soljóðandi:

"Samgongan vil menna dagstovnaøkið. Meiri tíð skal vera til námsfrøðiligt virksemi, trivnaðarskapan og málsliga menning millum børn. Námsfrøðilig gransking verður styrkt.

Dagstovnalógin skal dagførast saman við kommununum. Sama skulu serøkið við markamótum og normeringar á dagstovnaøkinum. Samgongan vil skipa eftirútbúgvingar og aðra førleikamenning av leiðslum, námsfrøðingum og starvsfólki annars.

Eykaflokkur av námsfrøðingum verður tikin upp.

Merittútbúgvingar og ískoytisskeið skulu skipast fyri at geva møguleika fyri víðari útbúgving á m.a. námsfrøði- og heilsuútbúgvingum."

Aðrastaðni í blaðnum eru samrøður við landsstýrisfólkini, sum hava ábyrgdina av at fremja lyftini í verki.

**Vit prenta her grein frá áhugaverda tiltakinum, sum áhugabólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum skipaði fyri í Klaksvík 3. november:**

# Vit mugu vera tilvitað um nærveruna

**Nærvera er natúrligur partur av professionalismuni sum námsfrøðingur. Men í einari tíð, har nógv er á skránni bæði heima og á dagstovnunum, er umráðandi at leggja eyka dent á løturnar við nærveru. Tað halda Bjarta Hansen og Judit Lassen, námsfrøðingar í Fjallafípuni, og Jórun Niclasen, leiðari á Námsfrøðiligu Ráðgevingini í Klaksvíkar kommunu**

TEKSTUR: ÓLUVA ZACHARIASEN
MYNDIR: JÓNA GUTTESEN

At ganga niðan á Kjøl uttan at skeita eftir klokkuni og merkja sigurskensluna brúsa, tá ið málið er rokkið.

At siga "góðan morgun" við hvørt einstakt barn og vita, hvat fyri barn vil sleppa at tekna eina løtu í friði, og hvør fyrst vil hava klemm nakrar minuttir, áðrenn dagurin kann byrja.

At sita á einum steini og bara hyggja rundan um seg.

At lesa søgu saman.

At spæla uttan skíggjar.

Hetta eru alt dømi um nærveru. Og nærveruna leggja tey stóran dent á í útibarnagarðinum Fjallafípuni í Klaksvík. Námsfrøðingarnir stremba eftir at leggja arbeiðið á stovninum soleiðis til rættis, at nærvera er ein natúrligur partur av gerandisdegnum hjá børnum og vaksnum.

Vit hava hitt Bjartu Hansen og Judit Lassen, sum starvast sum námsfrøðingar í Fjallafípuni, og Jórun Niclasen, leiðara á Námsfrøðiligu Ráðgevingini í Klaksvíkar kommunu, til eitt prát um nærveru á dagstovnum.



*Jórun Niclasen, leiðari á Námsfrøðiligu Ráðgevingini í Klaksvíkar kommunu, var útbúgvin sum námsfrøðingur longu í 1979. Ein broyting síðan tá er, at nógv meira er á skránni allatíðina á dagstovnunum í dag, heldur hon: - Eg haldi, at ferðin var ein onnur. Í dag gongur alt við rúkandi ferð, og viðhvørt hugsi eg, um børnini eru við í øllum tí, sum er á skránni. Vit høvdu eisini nøkur føst tiltøk um árið, men eg haldi, at tað er meira nú*

## Fundur í Klaksvík

Tær tríggjar vóru nevniliga millum framløguhaldararnar, tá ið áhugabólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum í november skipaði fyri fundi í Klaksvík.

Fundurin varð hildin á Skúlatrøð, og fleiri framløgur vóru á skránni. Eftir framløgurnar var orðaskifti millum luttakararnar, og júst spurningurin um nærveru var fleiri ferðir uppi og vendi. Fleiri nevndu, at í dag er so nógv á skránni hjá børnum, foreldrum og stovnum, og at tað er trupult at fáa nærveruna inn í gerandisdagin hjá barninum.

Tí hava vit spurt Bjartu Hansen og Judit Lassen, hvussu tey arbeiða við nærveru í Fjallafípuni, og Jóruna Niclasen, hvussu dagstovnar kunnu skipa seg og skapa karmar rundan um nærveruna.

Bjarta Hansen og Judit Lassen vóru liðugt útbúnir námsfrøðingar í ávikavist 2015 og 2019. Jórun Niclasen var útbúgvin námsfrøðingur í 1979. Hon hevur harumframt tikið

serlæraraútbúgving og er master í sosialpedagogikki.

## Nærvera má vera natúrlig

Tað er kanska eitt sindur ringt at seta heilt neyv orð á, hvat nærvera er fyri nakað. Tað snýr seg um at geva sær stundir, at vera til staðar og at savna seg um tey, tú ert saman við.

– Nærvera snýr seg um, at eg allatíðina eri tilvitað um, at tað snýr seg um tey fólkini, eg eri saman við. Og tá ið eg eri saman við teimum her, so má eg koyra tað burtur, sum gongur fyri seg har. Eg má savna meg um tey børnini, eg eri saman við nú, og um tað, vit eru saman um. Eg má eisini vera tilvitað um signalini, sum børnini senda, greiðir Jórun frá.

Hon sigur, at tá ið hon í síni tíð byrjaði sum námsfrøðingur, setti mann kanska ikki so nógv orð á hetta við nærveru. Hetta var bara nakað, sum var.

Nú eru vit farin at seta so nógv orð á hetta, og í hennara høvdi kann tað viðhvørt vera ein tvístøða, tá ið vit tosa um nærveru, tí vit skulu ansa eftir, at nærvera ikki verður kunstigt – nakað sum skal setast á skrá ella í eitt skema. Nærveran má vera natúrlig. Samanumtikið kunnu vit siga, at námsfrøði er nærvera.

– Summi siga, at tað vit gera, tað er umsorgan fyri børnunum. Ja, tað er ein sjálvfylgja. Tað er ein sjálvfylgja, har sum menniskju eru saman, at mann hevur umsorgan fyri hvørjum øðrum. Og serliga tá ið tað eru børn, sigur Jórun.



*Judit Lassen og Bjarta Hansen eru námsfrøðingar á útibarnagarðinum Fjallafípan, og vóru millum framløguhaldararnar. - Á einum dagstovni við nógvum skyldum og málum kann tað viðhvørt vera ein avbjóðing at vera 100 prosent til staðar og verja um nærveruna, ásanna tær*



*Nógv var at práta um, eisini aftaná formliga orðaskiftið. Fremst á myndini er tað Jógvan Philbrow, formaður í Pedagogfelagnum, sum fær eitt prát við Jóruna Niclasen, leiðara á Námsfrøðiligu Ráðgevingini í Klaksvíkar kommunu. Ímillum tey bæði sæst Sanna Brandal, námsfrøðiligur ráðgevi hjá Klaksvíkar kommunu*

## Nógv á skránni

Hóast nærveran eigur at vera ein sjálvfylgja, so eru Jórun, Judit og Bjarta samdar um, at tað í dag kann vera avbjóðandi at halda fast um nærveruna.

Hava familjurnar ov nógv á skránni í dag?

Í dag kunnu børnini fara til so nógv ymisk frítíðartilboð, eftir at tey koma heim úr barnagarðinum. Tað er sjálvandi ymiskt, hvat familjurnar trívast best við, men tað er ikki vist, at børn hava tørv á so nógvum tiltøkum hvørja viku. Í dag kunnu børn, frá tí tey eru trý ára gomul, byrja at spæla fótbólt, hondbólt, flogbólt, fimleik og svimjing.

Eisini dagstovnarnir hava nógv á skránni. Jórun heldur, at tað er væl meira á skránni á dagstovnunum í dag sammett við, tá ið hon var nýggj í fakinum.

– Jú, vit høvdu eisini nógv á skránni. Virksemið var nógv tengt at árstíðunum. Vit vóru nógv úti í náttúruni, høvdu ávís støð, sum vit vitjaðu javnan, og so var tað virksemið inni. Eg haldi, at ferðin var ein onnur. Í dag gongur alt við rúkandi ferð, og viðhvørt hugsi eg, um børnini eru við í øllum tí, sum er á skránni. Vit

høvdu eisini nøkur føst tiltøk um árið, men eg haldi, at tað er meira nú, sigur Jórun.

– Og so eru tað tiltøk sum til dømis jólahald. Sangir skulu venjast og lærast uttanat. Tað fer nógv tíð til fyrireiking av ymsum slag, sigur Judit.

Harumframt eru formlig krøv og skyldur, sum eru ásett frá myndugleikum.

– Nógv krøv verða áløgd stovnunum frá landinum – bæði gjøgnum dagstovnalógina, í menningarætlanum og so framvegis. Tað eru nógv pappír at fylla út. Eru børn við serligum tørvi á stovuni, samstarva vit við Sernám og Námsfrøðiligu Ráðgevingina. Hetta tekur eisini tíð. So er tað arbeiðið við Betri Vinum og antihapping, sum vit eisini skulu hava at passa inn í gerandisdagin á stovninum, sigur Bjarta.

## Síggja hvørt einstakt barn

Á einum dagstovni við nógvum skyldum og málum kann tað viðhvørt vera ein avbjóðing at vera 100 prosent til staðar og verja um nærveruna, ásanna Judit og Bjarta.

– Men vit royna altíð at vera sera tilvitað um at síggja hvørt einstakt barn og taka atlit til tey. Tú sært ikki bara ein bólk av børnum. Tú sært hvørt barnið. Hetta liggur í tí professionella sum námsfrøðingur, og tað liggur bara í bakhøvdinum, sigur Bjarta.

– Vit klemma tey ofta um morgunin og geva teimum tíð. Eitt til eitt er best um morgunin. Onkur vil í vindeygað at veittra. Onkur vil tekna í 5-10 minuttir. Onkur vil bara hava klemm. Vit vita, hvør vil hava hvat, sigur Judit.

Hon sigur, at tað er umráðandi, at børnini merkja, at tey eru sædd. Bjarta er samd.

– Um barnið fer afturum onkrastaðni, so fari eg altíð aftaná. Leggi kanska hondina á ryggin á barninum fyri at vísa, at eg havi sæð tað, sigur Bjarta.

Í Fjallafípuni royna tey sum sagt at fáa nærveruna inn í bæði gerandisdagin og í tey tiltøkini, sum tey skipa fyri á stovninum.

Og hvat gera tey so í Fjallafípuni um dagarnar?

Fjallafípan er ein náttúrubarnagarður fyri 5-7 ára gomul børn, sum liggur mitt í náttúruvakra økinum, Úti í Grøv. Hetta merkir, at børn og vaksin bert hava eitt lítið hanagleiv út í náttúruna, har viðarlundin, fjøran, áin og hagin eru spæliplássið. Og náttúran verður brúkt sera nógv, tí hon er eitt gott stað hjá børnum at hugsavna seg, uppliva nærveru, samstundis sum tey verða stimbrað og ment.

## Niðan á Kjøl

Eitt afturvendandi tiltak er árligi gongutúrurin úr Fjallafípuni niðan á Kjøl, sum er 342 metrar til hæddar. Á hesum túrinum fáa børnini stimbrað allar sansir, tey merkja nærveruna, og klokkan er ikki avgerandi – børnini brúka ta tíðina, tað tekur at ganga niðan, og ongin skundar undir. Túrurin varar so leingi, sum børnini eru upptikin av at vera túr.

– Tað er ofta so nógv fokus á, at vit




skulu náa okkurt innan fyri eina ávísa tíð, sigur Judit, sum heldur tað vera umráðandi, at børnini sleppa at merkja, at ongin tíðarkarmur er.

Bjarta hevur ofta gingið aftast, og hetta eru serligar løtur við hugna og nærveru.

– Mann kann seta seg niður og hugna sær. Fáa sær eitt bomm ella eina breyðflís úr matpakkanum, og so gongur mann víðari. Vit siga ikki ”kom nú”, men taka tað púra róliga. Og børnini eru sera glað, sigur Bjarta.

Hon minnist serliga eina ferð, tá ið tað tók sera langa tíð at ganga niðan. Hon fylgdist við einum barni í barnagarðinum.

– Vit komu niðan á Kjøl, tá ið hini børnini vóru á veg oman. Hetta barnið var SO fegið um, at nú hevði tað endiliga klárað hetta. Tá hugsaði eg, at tað var sera týdningarmikið, at vit tóku okkum ta tíðina, vit tóku niðan, sigur Bjarta.

## Nærvera og sosial sambond

Viðhvørt fara tey túr at hyggja at fuglum, eggum og pisum. Har læra børnini um náttúruna, og at tey ikki skulu nerta við eggini. So eru tað krabba-túrarnir, har tey fara oman í Grøv og ganga heilt inn í Borðoyarvík fram við fjøruni.

Túrarnir styrkja sosialu sambondini millum børnini og geva teimum eisini møguleika at menna nýggj

sambond, tí tey knappliga fylgjast við onkrum øðrum barni, enn tey plaga.

– Tá ið veðrið er gott, eru børnini í ánni. Har spæla tey bara, og so seta tey seg við einum matpakka. Tey eru bara har, sigur Judit.

– Mær dámar væl at vera úti og síggja børnini bara fella í spælið. Onkur setir seg á ein stein, og so kemur onkur annar og setir seg har. Har er ongin klokkutíð upp á spæl, sigur Bjarta.

Tey hava ein stóran stein nærhendis, sum tey plaga at vitja, og har spæla børnini altíð væl og leingi.

Hóast Fjallafípan er útibarnagarður, eru børnini eisini inni. Starvsfólkini hava tó verið tilvitað um, at leikurnar inni skulu vera av slíkum slag, at tær stimbra hugflogið, og sum børnini kunnu byggja sjálvi - perlur, litir, lego og so framvegis. Tey hava lutfalsliga fáar leikur, tí grundarlagið undir Fjallafípuni er uttandura umhvørvið.

## Von við klokku

Námsfrøðingarnir merkja ofta á børnunum, at tey eru von við, at klokkan avger nógv. Judit og Bjarta siga, at tá ið tey spæla ella gera okkurt kreativt, mugu tey viðhvørt minna børnini á, at tey hava góða tíð. At teimum ikki nýtist at skunda sær.

– Tað er týdningarmikið, at mann sum starvsfólk dugir at siga, at tað snýr seg ikki altíð um úrslit. Tað snýr seg um, at vit hava tað gott, læra nakað saman, ella at eg fái vakt forvitnið, sigur Jórun.

Sum starvsfólk mást tú duga at leggja uppgávur til viks, tí júst nú hevur nærleikin størri týdning. At tú velur at spæla eitt borðspæl, lesa søgu ella perla saman við børnunum.



*Fundurin var á Skúlatrøð í Klaksvík, og aftaná framløgurnar var orðaskifti*

Hetta er tó lættari sagt enn gjørt.

– Situr tú ein morgun við nøkrum børnum og spælir, og foreldur koma við einum barni, so sigur mann góðan morgun ella reisir seg upp at taka ímóti barninum, um onki annað starvsfólk er har júst tá, greiðir Judit frá.

Hetta er ein avbjóðing, ásannar Jórun og sigur tað hava stóran týdning, at einstøku dagstovnarnir eru tilvitaðir um at geva starvsfólkunum umstøður til nærveruna. Hetta kann millum annað gerast við at starvsfólkini skipa seg, soleiðis at tey til dømis avtala, hvør tekur ímóti, tá ið foreldur koma við børnum, meðan eitt annað starvsfólk fær frið at hugsavna seg um spælið ella søguna, sum er í gongd.

Júst hetta við at skipa seg er nakað, sum tey á Námsfrøðiligu Ráðgevingini viðhvørt hjálpa stovnum við, sigur Jórun.



*Tveir royndir stovnsleiðarar, Asta í Toft og Maja Højsted, fáa eitt prát*

## Korona lærdi okkum

Okkurt er kortini broytt við okkara strongda gerandisdegi seinastu árini, halda Judit, Bjarta og Jórun. Rákið tykist at ganga tann vegin, at fólk eru farin at geva sær betri stundir, og at tað ikki er so neyðugt, at nakað hendir alla tíðina. Hetta er serliga eftir koronufarsóttina.

Foreldrini duga til dømis betur at siga, at tey fara beint heim, tá ið tey koma eftir børnunum á dagstovninum. Tað er ikki longur so neyðugt, at nakað hendir eftir barnagarðin, og at onnur børn altíð skulu heim við at spæla. Fólk duga í dag betur at síggja eitt virði í onki at gera.

– Ja, eg haldi at rákið byrjar at venda. Foreldur seta meira orð á, at vit fara heim nú, og at tað ikki er neyðugt, at tað hendir meira, tá ið barnið hevur spælt fleiri tímar í barnagarðinum. Tað tykist eisini, sum at foreldrini eru meira tilvitað um, at barninum ikki nýtist at ganga til alt. Tey flestu hjá okkum ganga til eitt ella tvey frítíðarítriv, sigur Bjarta.

– Hetta rákið byrjaði kanska áðrenn korona, men eg haldi, at korona hevur lært okkum nógv um, at tað væl ber til at vera við hús, sigur Jórun.

Tað er sjálvsagt ymiskt frá barni til barn, hvat tey hava tørv á. Og familjur eru eisini ymiskar. Summar familjur trívast kanska best við, at nógv er á skránni, siga námsfrøðingarnir.

# 10 nýggir bústovnar í 10 ár

**Tørvurin á bústovnum á almannaøkinum er skjótt vaksandi og eisini størri, enn tað fyri fáum árum síðan varð roknað við. Tríggjar verkætlanir vóru settar í gongd av undanfarnu samgongu, og nýggja landsstýriskvinnan ætlar, at í minsta lagi ein bústovnur skal byggjast um árið í meðal næstu 10 árini. Frítíðartilboð til børn við serligum avbjóðingum skulu vera, har tørvur er á tí, og landsstýriskvinnan vil sum skjótast finna eina loysn á ósemjunum ímillum land og kommunur um uppgávubýtið á almannaøkinum**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

– Um vit ikki fáa bygt í minsta lagi ein bústovn um árið í miðal næstu tíggju árini, so kemur proppur í, tí tørvurin er so skjótt vaksandi.

Tað sigur Sirið Stenberg, sum tók við sum nýggj landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum eftir løgtingsvalið í desember.

Spurd um, hvørjar visjónir, hon hevur fyri almannaøkið næstu fýra árini, eru tað heldur ikki háfloygdir dreymar, ið renna henni fyrst til hugs, men tað, sum er alneyðugt at fáa gjørt skjótt á økinum bara fyri at fáa gerandisdagin at hanga saman.

– Bíðilistin bara veksur, og fleiri av verandi bústovnum hjá Almannaverkinum eru gamlir og treingja til at annaðhvørt dagførast ella skiftast út við nýggjar bygningar. So mín visjón er í fyrsta lagi at fáa teir fysisku karmarnar upp á pláss, og so sjálvandi eisini at arbeiða við innihaldinum í gerandisdegnum hjá teimum, ið skulu búgva á stovnunum, sigur landsstýriskvinnan.



*– Um vit ikki fáa bygt í minsta lagi ein bústovn um árið í miðal næstu tíggju árini, so kemur proppur í, tí tørvurin er so skjótt vaksandi, sigur Sirið Stenberg, nýggj landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

– Men nógv av tí, vit høvdu frammi í valstríðnum, og sum nú stendur í samgonguskjalinum, er eisini partur av hesum – bæði tað at útbúgva fleiri námsfrøðingar, og at betra arbeiðsumstøðurnar hjá teimum við hægri løn og styttri arbeiðsviku, og øllum hesum er tað sjálvandi eisini nógvar visjónir í, leggur hon afturat.

## Vallyfti hjálpa

Við ábyrgd av almanna- og mentamálum er tað ikki hon, sum eigur ítøkiligu uppgávuna at umseta vallyftini um lønarlyft, upptøku av fleiri námsfrøðilesandi og styttri arbeiðsviku til veruleika, hóast tað í stóran mun er á almannaøkinum, at hesi átøkini fara at gera sín virknað. Ta uppgávuna eiga ávikavist Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum, og Ingilín Didriksen Strøm, landsstýriskvinna í umhvørvismálum.

– Hetta eru stór politisk mál at fremja í verki, so sjálvandi komi eg eisini at hoyra um tey og kann siga mína meining á landsstýrisfundum. Men vit hava væntanir um, at hesi átøkini eisini fara at hjálpa uppá starvsfólkastøðuna á almannaøkinum, so eg vóni bara, at okkurt hendir skjótt – best var, um tað í hvussu er bleiv byrjað uppá at fremja øll tey trý átøkini í ár, sigur Sirið Stenberg.




Tað verður tað tó ikki, kunnu vit lesa um í øðrum greinum her í blaðnum. Farið verður ikki undir at lyfta lønarstøðið hjá teimum lægst løntu fyrr enn næsta ár, og tað sama er sannlíkt galdandi fyri stytting av arbeiðsvikuni. Men upptøka av einum eyka flokki av námsfrøðilesandi verður kortini longu í summar.

## Vaksandi tørvur

At landsstýriskvinnan vil hava ferð á byggingina av bústovnum kemur ikki av ongum. Fleiri av verandi bústovnum hjá Almannaverkinum kring landið eru ótíðarhóskandi og merktir av sliti. Oftast eru teir heldur ikki bygdir til endamálið.

Samstundis er tørvurin á búplássum vaksandi, og hann veksur væl skjótari, enn roknað varð við fyri bara fáum árum síðan. Serliga er talið av børnum og ungum við autismu vaksið nógv.

Á nýggjárinum í 2015 bleiv avtalan "Tann góða tilgongdin", hvørs høvuðsendamál er at savna tænastur til foreldur og avvarðandi at børnum við autismu, gjørd ímillum avvarðandi aðalráðini, Føroya Kommunufelag og Megd. Tá hevði Almannaverkið bara samband við 75 børn við autismu, og roknað varð við, at samlaða talið í landinum lá ímillum 150 og 200. Nú, átta ár seinni, eru 250 børn og ung við autismu fevnd av avtaluni.



*– Bíðilistin bara veksur, og fleiri av verandi bústovnum hjá Almannaverkinum eru gamlir og treingja til at annaðhvørt dagførast ella skiftast út við nýggjar bygningar. So mín visjón er í fyrsta lagi at fáa teir fysisku karmarnar upp á pláss, og so sjálvandi eisini at arbeiða við innihaldinum í gerandisdegnum hjá teimum, ið skulu búgva á stovnunum, sigur landsstýriskvinnan*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

– Nógv av teimum búgva heima, men so fáa tey heimaráðgeving ella aðrar tænastur frá Almannaverkinum, skúlaverkinum og heilsuverkinum, og tess fleiri tey eru, tess fleiri kunnu vit rokna við verða skrivað upp til pláss á bústovni, sum frá líður, sigur Sirið Stenberg.

## Gongd er á byggingini

Hon byrjar tó ikki á berum, tá tað snýr seg um at byggja bústovnar, tí undanfarna samgonga hevði longu lagt lunnar undir nakrar byggiverkætlanir.

Tríggjar av hesum byggiverkætlanum eru í gongd og verða lidnar í ár – tað er nýggja sambýlið á Mýruni í Hoyvík til fólk við menningartarni, sum fer at rúma 18 búfólkum, bú- og umlættingarheimið í Kvíggjartúni á Argjum, har tað verða seks búpláss, seks umlættingarpláss og eitt dagtilboð til 16 børn og ung við autismu, og sambýlið í Reynstúni á Argjum til fólk við menningartarni og fjølbreki, har rúm verður fyri 18 búfólkum.

Eisini gamli vinnubygningurin í Klaksvík, sum verður innrættaður við 15 búplássum til seinheilaskadd og til umlætting av seinheilaskaddum, og sum hevur fingið navnið Skálagarður, verður liðugur at taka í nýtslu í ár.

– Afturat hesum havi eg lagt ætlan fram á landsstýrisfundi um at fáa gjørt ein nýggjan bústovn í Havn til fólk við autismu, og har skulu 18 fólk kunna búgva, greiðir Sirið Stenberg frá.

## Byggja kring landið

Hon leggur dent á, at sjálvt um mesta byggivirksemið hjá Almannaverkinum í løtuni er í høvuðsstaðarøkinum, so er tað kring alt landið, at tørvur er á at byggja bústovnar.

– Nú havi eg ikki enn fult yvirlit yvir støðuna, men eg veit ítøkiliga, at tað er tørvur á at byggja nýtt í Vágum og Suðuroy, og tað vænti eg rættiliga vist, at tað eisini er aðrastaðni. Tí er

tað heldur ikki ov nógv sagt, at tað skal byggjast minst ein stovnur um árið, sigur Sirið Stenberg.

Tá hon metir tørv verða á einum nýggjum stovni um árið, roknar hon við í miðal 18 búplássum á hvørjum stovni í Havn, men smærri stovnar á bygd.

– Onkur verður kanska eitt sindur størri og onkur eitt sindur minni – alt eftir, hvør ætlast at búgva har, og hvar í landinum, tað er, tí í smærru bygdunum verður sjálvsagt talan um smærri stovnar, sigur Sirið Stenberg.

## Frítíðartilboð

Eitt annað mál, ið hon heldur vera átrokandi at fáa loyst, er frítíðartilboð til børn við serligum avbjóðingum – tað eru børn, ið ikki rúmast í frítíðartilboðunum, sum annars eru í kommununum kring landið.

Í januar lat eitt nýtt frítíðartilboð til børn við serligum avbjóðingum upp í gamla musikkskúlanum á Frúutrøð í Havn. Har er pláss fyri 18 børnum, men tað er ikki nóg mikið til at basa bíðilistanum í Tórshavnar Kommunu, sum taldi 34 børn, áðrenn nýggja tilboðið lat upp.

– Nei, tað skal meira til, hóast nýggja tilboðið munar væl, so bíðilistin í høvuðsstaðarøkinum nú er 16. Men tað er ikki bara í Havn, at tað mangla frítíðartilboð til børn við serligum avbjóðingum, og stendur tað til mín, skal hesin trupulleikin loysast skjótt. Tí tað setur foreldur og ofta onnur avvarðandi eisini í eina sera trupla støðu, tá onki frítíðartilboð er, tí tey mugu fara úr arbeiði fyri at vera um barnið. Og sjálvandi hevur tað eisini stóran týdning fyri barnið sjálvt, at tað sleppur at vera saman við øðrum børnum eftir skúlatíð.

– Eg ætli at royna at fáa sett so mikið av pengum av á fíggjarlógini næsta ár, at frítíðartilboð til børn við serligum tørvi kunnu setast á stovn kring landið, har tað er tørvur á tí, sigur Sirið Stenberg.

## Ósemja skal loysast

Triðja málið, hon helst vil hava sett flugubein út fyri skjótt, er ósemjurnar ímillum land og kommunur um ábyrgd av málum – oftast er tað borgarar, tað snýr seg um – í fella undir markamótsmál. Eitt, sum hevur verið nógv frammi í so máta, er ósemjur um, hvør hevur ábyrgdina av røktarkrevjandi persónum undir 67 ár.

– Landsstýrið hevur havt sín fyrsta fund við Kommunufelagið, og beinanvegin har gjørdi eg felagið vart við, at eg fór at venda aftur til teirra at tingast um eina loysn á hesum ósemjum einaferð fyri altíð. Tað ber snøgt sagt ikki til, at til dømis ein persónur, sum er blivin 67 ár, ikki sleppur inn á eitt vanligt røktarheim, tí viðkomandi hevur búð á einum bústovni hjá Almannaverkinum. Ella at ein persónur við seinheilaskaða ikki sleppur til umlætting á røktarheiminum í síni egnu kommunu, sjálvt um tað er pláss.

– Tað má og skal bera til at keypa tænastur frá hvørjum øðrum og gera avtalur um ein dagsprís ella eitt ella annað, sum er innan fyri rímilig mørk. Men eg má fyrst finna út av, hvat trupulleikin í veruleikanum er, og so skal hann bara loysast, sigur Sirið Stenberg.

# Lógarfest Normering og fyrireiking

**Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum, vil gera tað lættari hjá fólki við starvsroyndum frá námsfrøðiligum arbeiðsplássum at nema sær námsfrøðiliga útbúgving. Tað verður ongin skipan við, at pengarnir fylgja barninum, so leingi hann varar av dagstovnalógini. Hinvegin vil hann hava fyrireikingartíð og normeringar staðfest lógini**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Djóni Nolsøe Joensen, nýggi landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, er greiður yvir, at alt valla verður kýkað uttan mótstøðu, sum hann hevur sett sær fyri at fremja av broytingum í viðurskiftunum hjá námsfrøðingunum.

Tá tað kom upp, at ætlanir vóru um at stytta arbeiðsvikuna, vóru arbeiðsgevarar skjótir úti við atfinningum, tí teir sóu ætlanirnar sum inntriv í sáttmálaviðurskifti og harvið í frælsa samráðingarrættin.

Sannlíkt verður landsstýrismaðurin møttur við líknandi atfinningum, nú hann ætlar at fáa eitt nú normeringar og fyrireikingartíð staðfest í sjálvari dagstovnalógini.

Viðurskifti, sum hava við námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðin at gera, eru væl og virðiliga petta sundur ímillum fleiri aðalráð, men Djóni Nolsøe Joensen varðar av dagstovnalógini. Hon er frá 2000, og gaman í eru onkrar smávegis broytingar gjørdar í henni síðan tá, men hon treingir til eina veruliga dagføring, heldur Djóni Nolsøe Joensen.

## Alt í einari pulju

Og stendur tað til hann, verða sáttmálavunna fyrireikingartíðin hjá námsfrøðingunum og minstunormeringar fyri dagstovnarnar sett í lógina.

– Jú, eg vænti avgjørt, at onkur fer at kalla tað uppílegging í sáttmálaviðurskifti, men taka vit fyrireikingartíðina fyrst, so er hon komin inn



*– Eg legði eitt uppskot fram um lógarfesta normering, tá vit sótu í andstøðu, og eg haldi enn, at tað er tað rætta at gera, so vit fáa eina javna tænastu kring landið – eina eins góða tænastu fyri øll børn, sigur Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

við sáttmálaramráðingum, men tað er so nógv annað komið inn eisini, sum námsfrøðingar og hjálparfólk ikki hava biðið um, og sum at kalla ikki var fyrr – eitt nú fremmant mælt børn, børn við serligum tørvi, børn við kompleksum diagnosum, tung barnaverndarmál og sovorðið – og tað er alt sovorðið, sum ger arbeiðsbyrðuna tyngri.

– Nógv av hesum var at kalla ikki til, tá dagstovnalógin kom, men tað er greitt, at tíð má setast av til tað. Trupulleikin er so, at dagstovnarnir bara fáa eina pulju, sum allir eyka tímar skulu av, og so er tað upp til leiðaran at býta puljuna.

– Á onkrum stovni heldur leiðarin kanska, at fyrireikingartíðin hevur so stóran týdning, at tríggir-fýra tímar um vikuna til hvønn námsfrøðing skulu fara til tað, og so er onki eftir til hitt – ella tað merkir bara uppaftur tyngri arbeiðsbyrðu. Aðrastaðni sigur leiðarin kanska, at her verður ikki meira enn ein tími ella ongin til fyrireiking.

– Men um fyrireikingin fer at standa í lógini, so mugu kommunurnar eisini laga játtanina til stovnarnar eftir tí. Tað gevur onga meining at tosa um sáttmálavunna fyrireiking, tá hon bara kann skúgvast til viks uppa handa mátan, sigur Djóni Nolsøe Joensen.

## Ongar reglur

Tað sama er við normeringum, sum ongar yvirskipaðar reglur eru um í dag. Innan fyri karmarnar á dagstovnalógini, sum er ein rammulóg,

kunnu kommunurnar gera, sum tær hava hug til.

Tað einasta, sum lógin sigur um starvsfólk, er, at stovnurin skal hava ein leiðara, sum hevur námsfrøðiliga útbúgving, og at tveir triðingar av starvsfólkabýtinum skulu vera námsfrøðingatímar.

– Eg legði eitt uppskot fram um lógarfesta normering, tá vit sótu í andstøðu, og eg haldi enn, at tað er tað rætta at gera, so vit fáa eina javna tænastu kring landið – eina eins góða tænastu fyri øll børn. Sum er, er myndin skeiklað, tí tær kommunurnar, sum eru fíggjarliga væl fyri, Klaksvík og Runavík til dømis, koyra við høgum normeringum, meðan tær syðru, tær í Sandoynni og í Suðuroy, eru meira sperdar fíggjarliga og hava kanska lyndi at spara upp starvsfólkakostnaðin hjá dagstovnunum, greiðir Djóni Nolsøe Joensen frá.

Sjálv ásetingin í uppskotinum var soljóðandi:

"Fyri hvørji trý børn undir trý ár skulu í minsta lagi 40 starvsfólkatímar setast av um vikuna. Fyri hvørji seks børn eldri enn trý ár skulu í minsta lagi 40 starvsfólkatímar setast av um vikuna."

Afturat stóð, at um ein stovnur hevði opið meira enn 40 tímar um vikuna, so skuldi tímatalið hjá starvsfólkunum hækka samsvarandi, og hevði ein stovnur opið færri enn 40 tímar um vikuna, kundi brøkurin lagast eftir tí.

## Kommunur misskiltu

Fleiri kommunur vendu sær ímóti uppskotinum um lógarbundnar normeringar, tá hann legði tað fram á sinni, men atfinningarnar, sum hann serliga legði til merkis vóru frá kommunum, sum vóru væl fyri, og har onki var at koma eftir.

– Tær lógu oman fyri miðal fyri alt landið, tá tað galt starvsfólkatímar fyri hvørt barnið, og tær misskiltu uppskotið og hildu, at tær so vóru tvingaðar at lækka starvsfólkatalið. Men talan var um at lóggeva eina minstunormering, og tá er onki til hindurs fyri, at kommunur eru oman fyri ta normeringina. Prinsippið vil verða tað sama nú, har vit rokna eitt miðal fyri alt landið, og so verður tað ásett sum minstanormeringin, sigur landsstýrismaðurin.

Djóni Nolsøe Joensen leggur tó dent á, at enn er ein lógarfest minstanormering bara eitt hugsað ynski hjá sær, tí tað er ikki viðgjørt í hvørki samgonguni ella í landsstýrinum, tó at normering so hissini er nevnd í samgonguskjalinum.

Hann vísir tó á, at tað í Danmark eftir tógvið stríð er eydnast at lógarfesta eina minastunormering á dagstovnaøkinum. Í kanningararbeiðnum, sum bleiv gjørt har í sambandi við lógarsmíðið, kom fram, at summar kommunur høvdu framt stórar sparingar við at skerja starvsfólkahópin á dagstovnunum mest møguligt.

– Tað er vandin, tá ongar veruligar reglur eru at ganga eftir, men sum landspolitikari síggi eg tað eisini sum eitt týdningarmikið signal at senda, at vit vilja tryggja eitt ávíst støði í dagstovnaøkinum. Tí tað er altso vit, sum varða av dagstovnalógini, sigur Djóni Nolsøe Joensen.

Andstøðuppskotið um minstunormering varð lagt fyri tingið tvær ferðir. Fyrstu ferð var seint á heysti í 2019, tá øll tingmanningin hjá Javnaðarflokkinum legði tað fram. Tað fall eftir aðru viðgerð. Djóni Nolsøe Joensen legði tað so einsamallur fram aftur beint eftir ólavsøku í 2021, tá tað fekk somu lagnu.

## Lættari atgongd at lesa

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum hevur skjótt fingið víst, at hann og samgongan í hvussu er fóru at halda vallyftið um at taka fleiri námsfrøðilesandi inn á Fróðskaparsetrið. Pengar eru settir av í nýggja fíggjarlógaruppskotinum til at taka ein flokk afturat inn í summar. Frammanundan hevur tað bara verið ein flokkur.

Men Djóni Nolsøe Joensen ætlar meira enn tað, tí stendur tað til hann, so skal tað vera smidligari hjá fólki at fáa atgongd at lesa námsfrøði, hollar starvsroyndir á økinum skulu stytta um lestrartíðina, og tað skal bera til at hava tilknýti til arbeiðsmarknaðin, meðan lisið verður.

Góðskriving av starvsroyndum, ella meritt, sum tað ofta verður rópt, hevði óivað kunnað skundað undir tilgongdina av námsfrøðingum og harvið bøtt um stóra trotið á serliga dagstovnaøkinum.

Ein kanning, sum Hjálparfólkaráðið hjá Pedagogfelagnum gjørdi í januar 2020, vísti, at ein stórur partur av hjálparfólkunum, stívliga 36 prosent, høvdu viljað útbúgvið seg til námsfrøðing, um tey kundu arbeitt sum hjálparfólk samstundis, og starvsroyndirnar eisini blivu góðskrivaðar.

– Í valstríðnum vitjaði eg fleiri dagstovnar, og har mundi eg tilsamans hitta upp í einar tveir flokkar av hjálparfólkum, sum høvdu arbeitt í 10-15-20 ár á dagstovni, men sum høvdu fingið familju og sett búgv og ikki bara uttan nakað kundu taka fýra ár úr kalendaranum. Hinvegin høvdu tey fegin farið á skúlabonk í tvey ella hálvt triðja ár, um tey kundu gjørt tað við síðuna av arbeiðinum sum hjálparfólk, greiðir Djóni Nolsøe Joensen frá.

– Hetta er avgjørt eitt, eg beinanvegin ætli at kanna nærri, tí tað hevði hjálpt stórliga uppá sperdu støðuna á dagstovnaøkinum, um ein hampuliga stórur hópur av hjálparfólkum hevði kunnað lokið prógv sum námsfrøðingar uppá væl minni enn fýra ár – og uttan at tey hvurvu heilt av arbeiðsmarknaðinum ímeðan, sigur hann.

## Ósemja um sniðgøtur

Undanmaður hansara í útbúgvingarmálum, Jenis av Rana, dámdi ikki, at sniðgøtur skuldu stytta leiðina til eitt prógv sum námsfrøðingur, tí hann óttaðist, at tað fór at ganga út yvir tað fakliga støðið undir útbúgvingini.

Við Pedagogblaðið í november 2020 segði hann soleiðis:

"Útbúgvingin av námsfrøðingum er ein universitetsútbúgving, og ongar ætlanir eru um at broyta støðið á útbúgvingini".

Djóni Nolsøe Joensen hevur eina aðra fatan.

– Sjálvandi skal verandi leistur við fýra ára bachelor-útbúgving á Setrinum framhaldandi vera fundamentið

undir útbúgvingini til námsfrøðing, men vit hava áður brúkt sniðgøtur, tá stórt trot hevur tikið seg upp summastaðni á arbeiðsmarknaðinum, eitt nú við heilsuhjálparum og heilsurøktarum. Vit tosa um eina fyribilsloysn, og tilgongdin vil eisini steðga av sær sjálvum, sum frá líður, tá tey, sum høvdu hug at brúka møguleikan, hava brúkt hann.

– Eg eri heldur ikki so bangin fyri tí fakliga, um hetta verður væl hugsað inn í útbúgvingina hjá hesum partinum av lesandi og neyðug atlit verða tikin. Tvørturímóti kann tað í hesum døgum við vaksandi kompleksiteti í arbeiðnum kanska vera ein fyrimunur, tá ein nýútbúgvin námsfrøðingur, sum hevur fingið góðskrivað sínar starvsroyndir, kemur til arbeiðis, samanborið við ein nýútbúnan námsfrøðing, sum als ongar starvsroyndir hevur uttan kravdu praktikktíðina, sigur hann.

Eina aðra sniðgøtu, sum undanfarna samgonga hevði ætlanir at ganga á dagstovnaøkinum, millum annað við argumenti um, at tað kundi bøta upp á sperdu støðuna, vissar nýggi landsstýrismaðurin hinvegin um, at hann ikki ætlar at ganga.

Hann fer undir ongum umstøðum at slóða fyri eini skipan, har pengarnir fylgja barninum.



*- At lata pengarnar fylgja barninum er at máa støðið undan øllum tí, sum er bygt upp á dagstovnaøkinum og í námsfrøðiligum arbeiði í Føroyum. Tað er ein vandakós, sum ikki verður sigld, so leingi eg varði av dagstovnalógini, tað kann eg garantera*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

– At lata pengarnar fylgja barninum er at máa støðið undan øllum tí, sum er bygt upp á dagstovnaøkinum og í námsfrøðiligum arbeiði í Føroyum. Tað er ein vandakós, sum ikki verður sigld, so leingi eg varði av dagstovnalógini, tað kann eg garantera. Vit mugu minnast til, at pengarnir, sum fylgja barninum, verða tiknir frá dagstovnaøkinum, og tá slepst ikki undan, at tænastan verður verri. Kommunurnar hava gjørt eitt risastórt arbeiði við at byggja stórar og flottar dagstovnar, og so fara teir at standa hálvtómir, um pengarnir knappliga skulu fylgja barninum. Tað er púra ímóti mínum hugsjónum og sanniliga eisini púra ímóti mínum logikki, sigur Djóni Nolsøe Joensen avgjørdur.

# EIN TORFØR UPPGÁVA

**Lønirnar hjá teimum, sum arbeiða í umsorganarfakunum, verða ikki lyftar í ár, men í Fíggjarmálaráðnum hava tey hugsað um leistin, og okkurt, sum kann brúkast liggur á borðinum, sigur landsstýriskvinnan í fíggjarmálum. Hon leggur tó dent á, at enn er onki viðgjørt á nøkrum stigi innanhýsis í samgonguni**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Framsókn var kanska ikki tann flokkurin, sum í løgtingsvalstríðnum rópti harðast um eyka lønarlyft til útvaldar fakbólkar og stytting av arbeiðsvikuni. Men nú er Ruth Vang, forkvinna í Framsókn, vorðin landsstýriskvinna í fíggjarmálum, og tískil er tað fallið í hennara lut at koma við einum útspæli um, hvussu lovaða lønarlyftið skal býtast – og helst eisini, hvussu stórt tað skal vera, og hvussu tað skal fíggjast. Og tað verður í hvussu er hon, sum skal standa á odda fyri tingingunum um hetta, og hon sleppur heldur ikki undan at verða drigin uppí styttingina av arbeiðsvikuni, sum við vissu fer at kosta landskassanum fitt av pengum.

Ruth Vang gremur seg tó ikki um uppgávuna, og hon ásannar eisini, at lønin hjá eitt nú námsfrøðingunum ikki tykist serliga rættvís. Javnan verður lága lønarstøðið hjá námsfrøðingunum grundgivið við, at yrkið hevur ein fátæksligan søguligan arv í viðførinum, tí tað bleiv til sum eitt kvinnufak í eini tíð, tá kvinnur fingu lægri løn enn menn.

– Eg veit tó ikki, um tað er einasta orsøkin, tí lønin hjá til dømis námsfrøðingum er eisini lægri enn lønin hjá onkrum øðrum typiskum kvinnufakum, staðfestir hon.

## Ikki lætt

Eitt er landsstýriskvinnan tó vís í, og tað er, at tað verður ikki lætt at semjast um, hvør skal hava lønarlyft og hvussu nógv, og hvør ikki skal hava.

– Gaman í er onkur fakbólkur meira upplagdur enn onkur annar, men hvar skal skurðurin vera? Eg eri spent uppá, hvussu hetta fer at ganga. Vit hava jú tosað um hesar bólkarnar, sum hava eitt lágt lønarlag, men hyggja vit so ordiliga eftir, so síggja vit eisini aðrar lønarbólkar, ið liggja lágt, men vit kunnu jú ikki lyfta øll, tí so er líka vítt sum sítt.

– Tað er so bara ein partur av tí. Eitta annað er, at tað er rættiliga sannlíkt, at ein stórur partur av teimum, sum fara at fáa eitt lønarlyft, tá avtornar, eru kommunalt sett. So vit skulu eisini telva okkum fram til ein leist fyri hesum. Nei, hetta verður ein torfør uppgáva, men onkursvegna mugu vit finna út av at leggja skurðin har, sum tað er lættast at grundgeva fyri, hvør fekk



*–Eg eri spent uppá, hvussu hetta fer at ganga. Vit hava jú tosað um hesar bólkarnar, sum hava eitt lágt lønarlag, men hyggja vit so ordiliga eftir, so síggja vit eisini aðrar lønarbólkar, ið liggja lágt, men vit kunnu jú ikki lyfta øll, tí so er líka vítt sum sítt, sigur Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum, ið skal standa á odda fyri at fremja lovaða lønarlyftið í verki*

og hvussu nógv, og hvør ikki fekk, sigur Ruth Vang.

– Tað fer so í hvussu er ikki at eydnast okkum at finna eina semju um hetta, har øll eru nøgd, leggur hon afturat.

## Tingini hanga saman

Í samgonguskjalinum stendur, at trípartasamráðingar skulu liggja til grund fyri styttingini av arbeiðsvikuni úr 40 niður í 37 tímar, og Ruth Vang væntar, at tað eisini er verður okkurt slagt av trípartasamráðingum um lønarlyft.

– Lønarlyft og stytt arbeiðsvika hanga eisini í ávísan mun saman, tí tað vera nokkso nógv, serliga tey, ið hava parttíðarstørv, ið fara at fáa eina veruliga lønarhækking burtur úr, at arbeiðsvikan verður stytt, sigur hon.

Hóast tað ikki er hent fyrr í Føroyum, at ein stjórn vil lyfta lønarstøðið hjá útvaldum lønarbólkum, so standa tey ikki heilt á berum úti í Fíggjarmálaráðnum.

- Lønardeildin hevur øgiliga gott innlit í øll hesi viðurskiftini, og eg havi longu fingið onkran leist á borðið, sum kann brúkast. Men onki er enn viðgjørt á nøkrum stigi í samgonguni, og tað skal tað, áðrenn nakað ítøkiligt arbeiði við hesum byrjar, sigur Ruth Vang.

# Lógin skal vera klár á ólavsøku

**Samgonguskjalið sigur rættiliga neyvt, hvussu arbeiðsvikan skal styttast, men tað merkir ikki, at tann leisturin ikki kann broytast, sigur Ingilín Didriksen Strøm, landsstýriskvinna. Hon fyrireikar seg til samráðingar um eina trípartaavtalu, sum hava skund, tí lógaruppskotið um at stytta arbeiðsvikuna skal leggjast fyri tingið á ólavsøku**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Í fíggjarlógaruppskotinum, sum varð lagt fyri Løgtingið hálvan februar, er ongin upphædd sett av til at stytta arbeiðsvikuna, og sannlíkt merkir tað, at onki verður skarvað burtur av arbeiðstíðini í ár, hóast onkur kanska hevði væntað tað og enn fleiri ynskt tað.

Men tað merkir ikki, at málið liggur stilt, vissar Ingilín Didriksen Strøm, landsstýriskvinna í umhvørvismálum, um. Hon hevur eisini arbeiðsmarknaðarmál undir sær og hevur ábyrgdina fyri samráðingunum um eina trípartaavtalu, sum skal gerast ímillum arbeiðsgevarafeløgini og løntakarafeløgini á bæði tí almenna og tí privata arbeiðsmarknaðinum og landsstýrið um, hvussu praktiski leisturin fyri styttingini av arbeiðsvikuni skal vera.

Trípartaavtalan skal síðan vera grundarlag undir lógini um at stytta arbeiðsvikuna úr 40 niður í 37 tímar. Ætlanin er, at lógaruppskotið skal vera klárt at leggja fyri Løgtingið á ólavsøku, og tí hava fyrireikingarnar hjá landsstýriskvinnuni skund.

– Eg eri júst í ferð við at finna út av, hvussu samráðingarnar um eina sovorðna avtalu best verða skipaðar. Vit hava havt fleiri fundir um hetta, og nú haldi eg, at vit eru rættiliga nær við at hava funnið rætta mátan, so nú skulu vit bara taka nakrar avgerðir og síðan kalla inn til samráðingarnar, sigur Ingilín Didriksen Strøm.

## Byrja helst á nýggjárinum

Hon sigur, at tey allatíðina hava ætlað, at tann fyrsti tímin skal skarvast burtur av arbeiðsvikuni so skjótt, sum til ber, men væntar tó ikki, at tað er realistiskt at kunna seta hol á fyrr enn á nýggjárinum.

Í samgonguskjalinum er tað neyvt orðað, at arbeiðsvikan skal styttast við einum tíma annað hvørt ár. Eftir tí leistinum fer tað at taka seks ár at



*Ingilín Didriksen Strøm, landsstýriskvinna í umhvørvismálum, varðar eisini av arbeiðsmarknaðarmálum. Hon væntar, at lógaruppskotið um at stytta arbeiðsvikuna verður lagt fram á ólavsøku, og at fyrsti tímín verður skarvaður burtur av á nýggjárinum*

koma frá 40 niður í 37 tímar, men Ingilín Didriksen Strøm sigur tó, at orðingin í samgonguskjalinum ikki skal skiljast sum ein strang áseting, sum tað als ikki kann víkjast frá.

– Tað gevur jú ikki meining at hava trípartasamráðingar um leistin, um vit frammanundan hava gjørt av, júst hvussu hann skal vera. So tað verða samráðingrnar um trípartaavtaluna, sum fara at gera av, hvussu styttingin verður gjørd mest skynsamt, sigur hon.

## Neyvan stytt í einum

Jógvan Philbrow, formaður í Pedagogfelagnum, sigur í grein aðrastaðni her í blaðnum, at honum hevði dámt best, at styttingin bleiv gjørd í einum, tí tað hevði samstundis kunnað minkað munandi um aðrar trupulleikar á arbeiðsmarknaðinum, ikki minst starvsfólkatrotið á námsfrøðiligu arbeiðsplássunum.

Ingilín Didriksen Strøm skilir væl sjónarmiðið, men leggur tó dent á, at orðingin í samgonguskjalinum um stigvísa stytting hóast alt hevur sína orsøk.

– Tær royndir, tey hava gjørt sær aðrastaðni, tá tey hava stytt arbeiðstíðina, og sum vit eisini hava gjørt okkum her heima í so máta, siga, at við at gera styttingina í stigum, verða avleiðingarnar meira avmarkaðar fyri tey øki, ið annars merkja mest til styttingina – og tað er kanska serliga framleiðsluvinnan.

– So eg ivist í, at tað verður semja um at fremja styttingina í einum, men alt hetta verður væl og virðiliga viðgjørt og avgjørt í samráðingunum um trípartaavtaluna, sigur landsstýriskvinnan.

Ongar neyvar útrokningar eru gjørdar fyri, hvat tað tilsamans fer at kosta at stytta arbeiðsvikuna niður í 37 tímar. Á heysti í 2021 vísti ein kanning, sum teir báðir Jan Otto S. Holm, búskapar- og fíggjarfrøðingur, og Regin Berg, stjórnmálafrøðingur, gjørdu fyri Fakfelagssamstarvið, at ein stytting av arbeiðsvikuni niður í 37 tímar fór at kosta tí almenna stívliga 104 milliónir krónur netto. Privati parturin av arbeiðsmarknaðinum var ikki við í tí kanningini.

# Námsfrøðin skal verða sjónlig

**Námsfrøðingaráðið noyðist eisini í ár at hava eykaaðalfund fyri at manna nevndina. Unn Jarnskor Ellingsgaard tekur við vali, men tá vantar framvegis ein í. Í ár er ætlanin at gera eitt sindur burtur úr at varpa ljós á námsfrøðina**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Aftur í ár má Námsfrøðingaráðið kalla til eykaaðalfund at fáa fullmannað nevndina. Gunn Maritudóttir hevur gjørt av at gevast í nevndini, og ein annar nevndarlimur, Tina Tórarenni, hevur tikið við sum fyribils leiðari á dagstovninum í Maritugøtu í Havn og hoyrir tískil undir Leiðararáðið nú. Unn Jarnskor Ellingsgaard tekur við vali til nevndina, men tá vantar framvegis ein í.

Krista Hvannastein, forkvinna í Námsfrøðingaráðnum, sigur, at ferðin hjá teimum ikki var var so stór í 2022, tó at tey høvdu nakrar ráðsfundir og tiltøk á skrá.



*– Vit vilja fegin royna eisini at lýsa okkara arbeiðsøki úr einum meira positivum sjónarhorni. Tí sjálvt um vit eru hart sperd nógvastaðni, so gera okkara námsfrøðingar eitt knasandi gott arbeiði, sigur Krista Hvannastein, forkvinna í Námsfrøðingaráðnum*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

## Væl eydnað tiltøk

Eitt stórt og væl eydnað tiltak var 5. november, tá ráðið skipaði fyri evnisdegi um sálarligt umhvørvi í Løkshøll í Runavík við luttøku av Suna Poulsen, sálarfrøðingi, og Súsonnu Olsen, stjórnmálafrøðingi.

Nógv bleiv eisini gjørt burtur úr eykaaðalfundinum. Tá var Suni Poulsen eisini við, og í veruleikanum slóðaði eykaaðalfundurin í mai tískil fyri fyri evnisdegnum í november.

Í ár er ætlanin at hava eitt sindur

meira á skránni, millum annað fer Námsfrøðingaráðið at hugasavna seg um at sjónliggera námsfrøðiliga arbeiðið í Føroyum.

– Støðan í serliga Havn er sanniliga álvarslig og skal ikki tigast burtur, men nú hoyra vit bara tær negativu søgurnar. Vit vilja fegin royna eisini at lýsa okkara arbeiðsøki úr einum meira positivum sjónarhorni. Tí sjálvt um vit eru hart sperd nógvastaðni, so gera okkara námsfrøðingar eitt knasandi gott arbeiði, sigur Krista Hvannastein.

## Sjónlig kring landið

Av somu orsøk ætlar Námsfrøðingaráðið eisini sjálvt at verða meira sjónligt kring landið.

– Nú høvdu vit evnisdagin um sálarligt umhvørvi í Runavík, og ætlanin er eisini at fara í aðrar oyggjar og bygdir at hava limafundir og kanska okkurt annað tiltak, men vit hava tó als ikki planlagt nakað enn, sigur Krista Hvannastein.

Normeringar er eitt annað evni, sum hon heldur, at tað hevur týdning hjá Námsfrøðingarráðnum at varpa ljós á.

– Tað eru so ræðuliga nógvar arbeiðsuppgávur, sum verða koyrdar út á okkum, og tær skulu allar loysast innan fyri tann brøkin, sum tú arbeiðir, men tá er ofta ongin tíð eftir til fyrireiking og eftirmeting. Tú fært ikki rúm fyri eftirmeting og fyrireiking, uttan at tað verður tikið frá børnunum og borgarunum. Hetta er ein trupulleiki, sum vit veruliga eiga at varpa ljós á og fáa gjørt okkurt við, sigur Krista Hvannastein.

Í løtuni sita hesi í Námsfrøðingaráðnum:

**Jean Krista Hvannastein, forkvinna.**
**Gunn Maritudóttir, kassameistari.**
**Anja Haldansen, skrivari.**
**Tina Tórarenni, ráðslimur.**
**Dagny Miðskarð, ráðslimur**

# Unn nýggj í nevndini

Tað er longu greitt, at Unn Jarnskor Ellingsgaard úr Gøtu verður annar nýggi nevndarlimurin í Námsfrøðingaráðnum.

Unn er 45 ár og er í starvi sum námsfrøðingur á dagstovninum Gjáa í Gøtugjógv, har hon í 2020 bleiv vald til álitisfólk. Í løtuni er Unn tó útlánt sum stuðul hjá einum barni, sum gongur í forskúla í Skúlaspíranum í Leirvík og í frítíðartilboð á frítíðarheiminum Gásamýru, eisini í Leirvík.



*Unn Jarnskor Ellingsgaard*

Umframt betri løn er fremsta fakliga hjartamálið hjá Unn at fáa kravdar minstunormeringar á dagstovnaøkinum.

# Støðan merkir virksemið

**Leiðararáðið noyðist at kalla til eykaaðalfund í vár at velja tveir nevndarlimir. Ráðið kom víða um í sínum virksemi í fjør, greiðir forkvinnan frá, men virksemi og dagsskrá er merkt av sperdu støðuni á dagstovnaøkinum**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Joan Midjord og Hans Andrias Olsen hava boðað frá, at tey stilla ikki upp aftur til nevndina í Leiðararáðnum hjá Føroya Pedagogfelag, og tað merkir, at ráðið aftur noyðist at hava ein eykaaðalfund at velja tveir nevndarlimir í teirra stað. Væntandi verður eykaaðalfundurin einaferð í vár.

Eisini fyri tveimum árum síðan var neyðugt við eykaaðalfundi at manna nevndina í Leiðararáðnum.

Annars var virksemið fjølbroytt í 2022, greiðir Mirjam Johannesen, forkvinna frá, og sperda støðan, ið valdar á dagstovnaøkinum, serliga í Havn, hevur sett dagsskránna og merkt tað virksemið, sum hevur verið, sigur hon.

– Tað er tilvitað, og tað er eisini púra náttúrligt, at tað, sum vit eru so upptikin av í gerandisdegnum, eisini sæst aftur í øllum øðrum, vit gera, sigur Mirjam Johannesen.

Hon sipar millum annað til val av evnum og gestum til tiltøk, sum Leiðararáðið skipar fyri. Á landsleiðaradegnum, sum ráðið skipaði fyri á Hotel Hilton 28. oktober, var kendi danski journalisturin og fyrilestrahaldarin Niels Overgaard høvuðsnavnið.

Niels Overgaard er hugtikin av tí stoisku heimsspekini, sum í stóran mun snýr seg um at finna innara friðin í frástøðu til ein strongdan gerandisdag.

Og nú Leiðararáðið noyðist at hava eykaaðalfund í vár, verður roynt at fáa ein annan kendan fyrilestrahaldara við á fundin at tosa um leiðaraskomm.

– Støðan á dagstovnaøkinum ger, at nógvir leiðarar og eisini vanlig starvsfólk hokna undir strongd, og nógv av okkum stríðast eisini við skomm, vit skammast um, at vit ikki røkka til. Tí er tað ikki til dømis nýggj leiðsluamboð, vit seta á breddan, tá vit skipa fyri tiltøkum nú – tí vit hava meira brúk fyri amboðum og vísum orðum at handfara okkara egnu strongd, skomm og

aðrar negativar kenslur, sum støðan elvir til, sigur Mirjam Johannesen.

Leiðararáðið hevur eisini verið á Viðareiði saman við nevndini í Pedagogfelagnum at arbeiða við fyrireikingum til sáttmálasamráðingar, og umboð fyri ráðið hava verið á ráðstevnu í Danmark um sálarligt arbeiðsumhvørvi.

Mirjam Johannesen leggur dent á, at Leiðararáðið als ikki bara brúkar sína orku uppá Havnina og starvsfólkatrotið har, sjálvt um tað er dagstovnaøkið í Havn, sum hevur fylt nógv í miðlunum í seinastuni.

– Fyri nøkrum mánaðum síðan vóru tað bygnaðarbroytingarnar í Almannaverkinum, sum vit fundaðust nógv um, og seinasta summar var tað um lætting, sum skuldi steingja. Tað er ikki alla tíðina tað sama, og tað er bestemt heldur ikki bara í Havn, at trupulleikar eru, sigur forkvinnan í Leiðararáðnum.

Ein gongd, sum vekir stúran í Leiðararáðnum, er tað, tey á enskum kalla brain drain – tað at vitan hvørvur – orsakað av ofta óumhugsaðum og óskynsomum bygnaðarbroytingum.

Bæði á dagstovnaøkinum og í Almannaverkinum eru hendar broytingar, sum hava havt við sær, at vitan er skolað burtur, tí dugnaligir leiðarar hava sagt upp ella bara hvørva í sambandi við bygnaðarbroytingar, halda tey í Leiðararáðnum.

Tey stúra fyri, hvørja ávirkan so stór útskifting av starvsfólkum, ikki bara á dagstovnum, men eisini á serøkinum, hevur á borgaran, og tey



*Mirjam Johannesen leggur dent á, at Leiðararáðið als ikki bara brúkar sína orku uppá Havnina og starvsfólkatrotið har, sjálvt um tað er dagstovnaøkið í Havn, sum hevur fylt nógv í miðlunum í seinastuni*

*Mynd: Kári við Rættará*

sakna, at eitt nú námsvísindadeildin/Setrið sum granskingarstovnur kemur á banan og sigur sína hugsan um støðuna á námsfrøðiliga økinum í Føroyum.

Tó at støðan á dagstovnaøkinum er trupul, eru tað ikki nógvir leiðarar, sum venda sær beinleiðis til Leiðararáðið, sigur forkvinnan.

Fyrr var Leiðararáðið hjásiti í málum, har leiðarar onkursvegna vóru í klemmu, og tá var gjarna nógv

samband millum ráð og leiðarar. Nú veitir Pedagogfelagið sakførarahjálp í slíkum málum í staðin, og tí er tað náttúrligt, at tað verður longri ímillum, at leiðarar leita sær ráð og hjálp frá Leiðararáðnum.

– Tað er sjálvandi ein orsøk, men eg haldi, at ein onnur orsøk til, at vit hoyra so lítið til leiðararnar nú, kanska er ein avleiðing av koronu. Korona hevur vant leiðararnar at klára alt sjálvar. Ella at orka ikki er til annað enn at verja borg, so teir ikki røkka út til onnur, sigur Mirjam Johannesen.

Í leiðararáðnum sita í løtuni hesi:

**Mirjam Johannesen, forkvinna, dagstovnsleiðari í Havn, vald fyri trý ár í 2021.**
**Turið Horn, dagstovnsleiðari í Tórshavn, vald fyri trý ár í 2021.**
**Elisabeth Henriksen, leiðari á verkstaðnum Vón, Almannaverkið, vald fyri trý ár í 2021.**
**Hans Andrias Olsen, frítíðarskúla- og dagstovnsleiðari í Rituvík, valdur fyri tvey ár í 2021.**
**Joan Midjord, leiðari í sjálvsognarstovni/serstovni í Klaksvík, vald fyri tvey ár í 2021.**
**Anna Maria Erlingsdóttir, dagstovnsleiðari í Vági, er eykalimur.**

---

# KRØV UM EFTIRLØN OG NEVNDARSESS

**Hjálparfólkaráðið vil aftur hava kravda umboðan í nevndini í Føroya Pedagogfelag, og forkvinnan í ráðnum krevur, at hjálparfólkini fáa somu eftirløn í prosentum sum námsfrøðingarnir**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Sunrid Vatnsdal, forkvinna í Hjálparfólkaráðnum hjá Pedagogfelagnum, hevur eini greiðan boðskap til formannin í felagnum at leggja sær í geyma, nú sáttmálasamráðingar aftur skulu verða: Hjálparfólkini skulu hava sama eftirlønarprosent sum námsfrøðingarnir, sama um

arbeiðsgevarin er ein kommuna ella Almannaverkið.

– Tað er sjálvandi í lagi, at námsfrøðingarnir fáa meira í løn enn vit – tað skulu teir hava, tí teir hava tikið eina útbúgving. Men tað er als ikki í lagi, at hjálparfólk og námsfrøðingar, sum arbeiða lið um lið, hava ymiskt eftirlønarprosent. Tí má tað vera eitt av fremstu krøvunum hjá Pedagogfelagnum í sáttmálasamráðingunum, at vit verða lyft upp á 14 prosent í eftirløn hjá Almannaverkinum, so vit fáa tað sama í prosentum, sum námsfrøðingarnir, sigur Sunrid Vatnsdal.

## Fastan nevndarsess

Forkvinnan í Hjálparfólkaráðnum heldur eisini, at tað er upp á tíðina, at ein sessur í nevndini hjá Pedagogfelagnum verður markaður til hjálparfólk.

– Tað má so leggjast fyri ein aðalfund. Seinast var tað um reppið, at vit ikki blivu umboðað í nevnini. Tað stóð á jøvnum, so eitt lutakast ímillum eitt hjálparfólk og ein námsfrøðing skuldi gera av, hvør fekk sessin. Hesa ferð vann hjálparfólkið, men tað kundi tað sama verið øvugt. Í Pedagogfelagnum samstarva hjálparfólk og námsfrøðingar væl, men tað sigur seg sjálvt, at vit eru betur stødd, um vit hava vissu fyri altíð at vera umboðað í nevndini, sigur Sunrid Vatnsdal.

## Hittast ov sjáldan

Hon heldur, at Hjálparfólkaráðið kanska kundi havt fingið meira av skafti í 2022.

– Tveir ráðslimir hava verið í Danmark og vitja stovnar og tosað við hjálparfólk har. Hesum vænti eg, at



*- Tað er sjálvandi í lagi, at námsfrøðingarnir fáa meira í løn enn vit – tað skulu teir hava, tí teir hava tikið eina útbúgving. Men tað er als ikki í lagi, at hjálparfólk og námsfrøðingar, sum arbeiða lið um lið, hava ymiskt eftirlønarprosent.*

tær fara at greiða frá á okkara aðalfundi.

– Men vit hava verið ov lítið saman í ráðnum í fjør, tað má eg ásanna. Tað vísir seg at vera nokkso ringt at savna tropparnar, tí vit arbeiða øll nógv, og kanska eru vit heldur ikki komin ordiliga upp í ferð aftur eftir koronu, sigur Sunrid Vatnsdal.

Í Hjálparfólkaráðnum stendur eingin fyri vali, og sær nevndin soleiðis út:

**Sunrid Vatnsdal, forkvinna.**
**Anne Lisa Davidsen, næstforfólkvinna.**
**Oda Dalfoss, skrivari.**
**Birgit Thomsen, kassameistari.**
**Hansine Brandt, nevndarlimur.**



Nýggj tænasta frá LÍV

# Vel títt váðastøði

Øll skulu vit spara saman til okkara eftirløn, og nú kanst tú velja tað váðastøði, tú vilt hava.

**Vel eitt váðastøði, ið hóskar til tín.**

Títt váðastøði í dag

## miðal

Miðað verður eftir

**35%** lánsbrøvum

**65%** partabrøv & alternativar íløgur

## varið

Miðað verður eftir

**45%** lánsbrøvum

**55%** partabrøv & alternativar íløgur

## høgt

Miðað verður eftir

**15%** lánsbrøvum

**85%** partabrøv & alternativar íløgur

## partabrøv

**100%** partabrøv

## Hvat skal eg gera?

Set teg í samband við okkum, um tú vilt broyta til annað váðastøði, ella um vilt frætta meira um tínar møguleikar.

**Vit sita klár á tlf 31 11 11**

Les meira á liv.fo

liv.fo